# Tilmæli
# um serliga skipað miðnám
# sum heildartilboð
# til ung við serligum tørvi

**Handað Mentamálaráðnum og Almannamálaráðnum 30. januar 2015**

# INNIHALD

Fororð ..... 3

Arbeiðssetningur hjá arbeiðsbólkinum ..... 5

1.0 Inngangur ..... 7

2.0 Tilmælini í høvuðsdrøgum ..... 11

3.0 Tørvslýsing ..... 12

4.0 Miðnámsskúlatilboð ..... 14

4.1 Yvirskipaður bygnaður ..... 14

4.2 Serliga Skipað Miðnám- SSM ..... 16

4.3 Skúlatíðin og tíðin, skipað við stuðulsfyriskipanum ..... 17

4.4 Hølisviðurskifti ..... 17

4.5 Innihald ..... 18

4.6 Prógv ..... 19

4.7 OCN - Open College Network ..... 19

4.8 Tilmæli um at broyta Rásina ..... 20

5.0 Starvsfólk ..... 23

5.1 Krøv til útbúgving ..... 24

5. 2 Sernámsfrøðilig ráðgeving ..... 25

6.0 Bú- og stuðulsfyriskipanir ..... 27

6.1 Stuðulsfyriskipanir av týdningi fyri málbólkin til SSM ..... 27

6.2 virkis-, stuðuls- og frítíðartilboð á Trivnaðardeplinum ..... 28

6.3 Bútilboð ..... 29

6.4 Nýggj samskipað skúla- og stuðulstilboð í samband við skipan av serligum miðnámi ..... 30

7.0 Tilgongdin at stovna og staðseta fleiri skúla-, stuðuls-, frítíðar og bútilboð ..... 32

2015: ..... 32

2016: ..... 33

2017: ..... 33

2018: ..... 34

8.0 Visitatiónstilgongd ..... 37

9.0 Samskipan ..... 40

10.0 Fíggjarviðurskifti hjá næmingunum ..... 41

11.0 Kostnaðarætlan ..... 42

11.1 Kostnaðarætlan í sambandi við stovnsetan av Serliga Skipaðum Miðnámi ..... 42

11.2 Rásin ........................................................................................................................................ 45
11.3 Sernámsfrøðilig samskipan og ráðgeving ................................................................................... 45
11.4 Kostnaðarætlan fyri stuðulsfyriskipanir ísv SSM ......................................................................... 45
12.0 Uppskot til ábyrgdar- og útreiðslubýtið millum Mentamálaráðið og Almannamálaráðið ........................ 48
13.0 Endurskoða lóggávuna og gera uppskot um tillagingar í mun til uppskotið, sum arbeiðsbólkurin kemur við. ........ 49
14.0 Niðurstøða ................................................................................................................................... 50
15.0 Tilmæli ......................................................................................................................................... 52
16.0 Keldulisti ...................................................................................................................................... 54
17.0 Fylgiskjøl ...................................................................................................................................... 55

# FORORÐ

Farið er undir eina tilgongd, har málið er at tryggja øllum ungum í landinum eitt miðnámsskúlatilboð uttan mun til førleikar. Miðnám er í hesum sambandi at skilja sum skúlatilboð til ung eftir loknan fólkaskúla og upp til 25 ára aldur. Miðnám merkir ikki endiliga eitt studentsprógv ella annað prógv í vanligari merking, men ein onnur útbúgving og eitt annað prógv, sum eru lagað eftir einstaka næminginum í møguligum tilknýti til annað virksemi t.d. á arbeiðsmarknaðinum.

Rætturin til útbúgving er staðfestur í ST- sáttmálanum um rættindi hjá teimum, ið bera brek, har § 24 um útbúgving ásetir, at øll hava rætt til skúlatilboð í *vanligu* skúlaskipanini.

Sum støðan er í dag, vanta skúlatilboð til ung við serligum tørvi. Politiska ynski er at bøta um hesi viðurskifti. Í samgonguskjalinum hevur sitandi samgonga staðfest, at hetta arbeiðið skal raðfestast í samgongutíðarskeiðnum. M.a. er ásett í samgonguskjalinum, at: "*víðkað tilboð verða givin ungum við serligum tørvi*", og í Heildarætlan landsstýrisins frá 2013 um Fólkaflyting og Fólkavøkstur er politiskt ynski um, at fleiri tilboð til ung við serligum tørvi verða skipað.

Tá ið talan er um ung við serligum tørvi, er tað umráðandi, at hugsað verður í eini heildarloysn, har tað ymiska virksemið í gerandisdegnum hjá tí unga stuðlar hvørt annað. Í tráð við hesa og meginregluna um sektorábyrgd hevur landsstýrið ásannað, at skal málið røkkast, er neyðugt, at hesi tilboð verða samskipað millum stjórnarráðini, sum hava ábyrgd fyri økinum. Hetta soleiðis, at heildartilboð, í tann mun ynski og tørvur er á tí, verða givin bæði í mun til skúla-, frítíðar- og

búpartin í einum skipaðum samstarvi, har Mentamálaráðið hevur ábyrgdina av skúlapartinum, og Almannamálaráðið hevur ábyrgdina av at veita bú- og frítíðartilboð.

Arbeiðið at skipa fleiri serliga skipað tilboð á miðnámi fyri ung við serligum tørvi er byrjað m.a. við einum serflokki innan autismuøkið í Hoydølum. Somuleiðis er lógarbroyting samtykt fyri gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar, sum heimilar hesum serliga skipaðu tilboðunum fyri ung við serligum tørvi. Ætlanin er at gera somu lógarbroytingar á yrkisútbúgvingarøkinum. Í sambandi við hesi tilboð er eisini ætlanin, at hesi verða skipað í samstarvi millum stjórnarráðini, í tann mun tað er neyðugt við samstarvi um skúla-, frítíðar- og búpartin. Hetta er eisini í tráð við *Ta góðu tilgongdina,* sum ávikavist Almannamálaráðið, Mentamálaráðið og Heilsumálaráðið samstarva um.

Skúla-, frítíðar- og bútilboðið Rásin hevur virkað síðani 2002 eftir sama leisti, sum er avmarkað til 7 pláss 3. hvørt ár. Ynskið hevur tó verið um at víðka um tilboðið, so at fleiri kunnu fáa gagn av tilboðnum, og at møguleiki skal vera fyri at taka næmingar inn hvørt ár. Eisini er ynski um ávikavist at styrkja um skúlapartin og bú- og frítíðarpartin og at kunna skilja hetta meira at, hóast tað tilboðið verður varðveitt sum ein eind. Ætlanini er at skipa heildartilboðini við íblástri frá royndum úr okkara grannalondum.

Ein fortreyt fyri at kunna víðka um virksemið á økinum sum heild og geva tí eitt øðrvísi innihald er neyvari samskipan og samstarv millum ávikavist Mentamálaráðið og Almannamálaráðið. Fyri at hetta skal lata seg gera, má játtan setast av, sum er oyramerkt til skúla-, stuðuls- og bútilboð. Økið má raðfestast við neyðugum tilfeingi t.e. starvsfólkum, hølum, játtan til rakstur o.a.

Sum ein liður í at kunna arbeiða víðari við hesum máli, hava landsstýrisfólkini í Mentamálaráðnum og Almannamálaráðnum, Bjørn Kalsø og Annika Olsen, sett ein arbeiðsbólk til at gera eitt uppskot og fyrireika tilgongdina um at víðka og samskipa skúla- frítíðar- og bútilboð til ung við serligum tørvi, so tilboð verða klár til skúlaársbyrjan í august 2015.

## ARBEIÐSSETNINGUR HJÁ ARBEIÐSBÓLKINUM

Við støði í ST-sáttmálanum um rættindini hjá teimum, sum bera brek, og við íblástri frá donsku STU-skipanini og tí íslendsku skipanini, skal arbeiðsbólkurin gera ítøkiligt uppskot til víðkan av stuðuls-, bú- og skúlatilboðum til ung við serligum tørvi. Arbeiðsbólkurin skal koma við uppskoti og gera eina ítøkiliga lýsing av:

1. Orsøkunum til, at skúla-, bú- og frítíðartilboðini eiga at víðkast, mennast og styrkjast
2. Málbólki fyri tilboðini
3. Tørvinum
4. Visitatiónini
5. Upptøku- og næmingatreytum m.a. tær fíggjarligu
6. Yvirskipaða bygnaðinum
7. Innihaldi í ávikavist skúla-, frítíðar- og búpartinum og útgreina, hvussu tilboðini kunnu samskipast, harundir hvussu Rásin skal skipast framyvir.
8. Kostnaðarætlan
9. Uppskoti til ábyrgdar- og útreiðslubýtið millum Mentamálaráðið og Almannamálaráðið
10. Endurskoða lóggávuna og gera uppskot um tillagingar í mun til uppskotið, sum arbeiðsbólkurin kemur við.

Arbeiðsbólkurin hevði fyrsta fundin 20. august 2014 við landsstýrisfólkunum og skuldi verða liðugur við arbeiðið 19. jan. 2015, sum so varð flutt til  30. jan. 2015. Arbeiðið hevur verið skipað við fundum, arbeiðsdegi, bólkaarbeiði og uppsamling og vitjanum m.a. á Rásini, Skúlanum á Trøðni og Sernámi. Eisini hevur arbeiðsbólkurin verið arbeiðs- og kanningarferð í Íslandi og Danmark.

Frágreiðing frá vitjanini uttanlands liggur sum fylgiskjal og er brúkt í tilmælinum sum tílvísingarkelda. Eisini hevur arbeiðsbólkurin havt kunnandi fund í januar mánað við MBF og undirliggjandi feløg, avvarðandi fakfeløg og leiðslurnar fyri miðnámsskúlar og Almannaverkið. Endamálið við hesum fundunum hevur verið at fingið viðmerkingar og íblástur frá hesum til arbeiðið at gera tilmæli.

**Tey, ið manna arbeiðsbólkin, eru:**

Frida Poulsen, fulltrúi, Mentamálaráðið

Doris Bjarkhamar, fulltrúi, Almannamálaráðið

Emmy Joensen, stjóri, Sernám

Elin Debes, fulltrúi, Almannaverkið

Eyðvør Mortensen, fulltrúi, Almannaverkið

Óli Wolles, umsitingarleiðari, Studentaskúlin á Kambsdali

Sonni Óli Djurhuus, leiðari, Rásin

Tóra við Keldu, forkvinna, Meginfelag teirra brekaðu




**Tórshavn hin 30. januar 2015**

# 1.0 INNGANGUR

Stórur tørvur er á at geva ungum møguleika at fáa skúlatilboð í Føroyum, og átrokandi er at fáa gjørt nakað við trupulleikan. Tøl frá tørvslýsingini, sum er gjørd í sambandi við hetta tilmælið, vísa, at tað eru nógv við serligum tørvi í Føroyum í aldrinum 16 – 25 ár, sum ikki hava nakað skipað virksemi í gerandisdegnum í dag[1]. Teimum tørvar skúlatilboð saman við stuðuls- og/ella bútilboði. Um onki verður gjørt við avbjóðingina at skipa fleiri samskipað tilboð, hevur hetta uttan iva stórar samfelagsligar og persónligar avleiðingar. Útfrá tølunum í dag verður væntað, at í framtíðini, tá ið stóri tørvurin er nøktaður, fara hvørt ár umleið 30 ung at hava tørv á serliga skipaðum tilboðum á miðnámi.

Tørvurin á tilboðum til ung eftir fólkaskúlan hevur javnan verið á breddanum seinastu árini. M.a. skipaði Ráðið fyri brekað fyri fundi á heysti 2014, har tað kom fram, at tørvur veruliga er á slíkum tilboðum í Føroyum. Aðrir felagsskapir, td. Javni hava eisini víst á ein stóran tørv, eins og hesin tørvur eisini var tikin við í skuggafrágreiðingina hjá MBF til ST-nevndina í 2014 viðvíkjandi ST-sáttmála um rættindi teirra, ið bera brek[2][3].

Nevnast skal tó, at arbeiðið er smátt um smátt farið í gongd, har miðnámsskúlar hava roynt at skapa møguleikar fyri næmingunum, sum tørva stuðul at nema sær miðnám, og nevnast kann eisini t.d. flokkurin innan autismuøkið í Hoydølum.

Fyri Føroyar, eins og tað er fyri lond, ið vit ynskja at samanbera okkum við, er yvirskipaða málið, at øll fáa nýtt sínar gávur og førleikament seg útfrá tí støði, tey eru á. Hetta er neyðugt bæði í mun til, at Føroyar eins og onnur lond hava viðurkent, at fólk við serligum tørvi skulu hava javnbjóðis rættindi eins og onnur, tí at tað er eitt yvirskipað mál, at fleiri føroyingar skulu hava útbúgving, og tí at samfelagið hevur tørv á, at fleiri fólk luttaka á arbeiðsmarknaðinum. Fyri at nærkast hesum yvirskipaða máli, tekur hetta tilmælið støðið í 4 meginreglum, sum mugu havast í huga, tá ið slík heildartilboð verða skipað. Hesar eru: ***Geiraábyrgd, innklusjón, kompensatión og samskipan.***

---

[1] Fleiri av hesum hava okkurt stuðuls- og/ella frítíðartilboð frá Almannaverkinum.

[2] Sí frágreiðing um hoyringina av ST-sáttmálanum um tey, ið bera brek. http://www.mbf.fo/page.php?Id=44&l=fo

[3] Viðmerkingina frá ST nevndini til grein 24, sum kom til Føroya landsstýri. *Nevndin hevur ampa av manglandi greiðu á, í hvønn mun næmingar, ið bera brek, kunnu fáa nøktandi stuðul og tilvenjing fyri at lætta um útbúgving teirra, og mismunin í úrsliti hjá næmingum, ið bera brek, og teimum, ið ikki bera brek. Hetta er galdandi í barnaskúla, miðnámi og framhaldsskúla og hægri útbúgving.*

Breksáttmálin, sum Føroyar hava tikið undir við og bundið seg til at fylgja, byggir á meginregluna um geiraábyrgd. Meginreglan um geiraábyrgd merkir, at hvør myndugleiki, ið hevur ábyrgd av at veita eina ávísa almenna tænastu ella veiting, hevur ábyrgd at tryggja og fíggja, at somu tænastur eisini verða veittar borgarum við serligum avbjóðingum. Í tráð við geiraábyrgdina hevur Almannamálaráðið ábyrgd av at veita og fíggja stuðuls-, frítíðar- og bústaðartilboð til ung við serligum tørvi í sambandi við serliga skipað tilboð á miðnámi, og Mentamálaráðið hevur ábyrgd av at veita og fíggja skúlatilboð til fólk við serligum avbjóðingum. Hetta endurspeglast í fólkaskúlalógini, ið staðfestir, at fólkaskúlin er fyri øll. Lógarbroyting innan gymnasialt miðnám er framd, soleiðis at heimild er at skipa serliga skipað skúlatilboð og aðrar breytir. Hetta eru nýggir møguleikar í Føroyum. Í londunum uttan um okkum er hetta sett í verk, og fáa ung eitt miðnámsskúlatilboð, sum er lagað til einstaklingin. Endaliga prógvið er eisini tillagað, so at tað eisini vísir førleikar og evni, sum geva møguleika at fara víðari í arbeiði ella í viðkomandi útbúgving.

Meginreglan um geiraábyrgd hevur eisini stóran týdning í mun til, at allir borgarar skulu hava somu viðferð, og at allir borgarar hava somu virði, sum aðrir borgarar í landinum. Borgarar, ið hava serligar avbjóðingar, skulu ikki noyðast í serligar fyriskipanir/tænastur, tí at almennu tænasturnar ikki eru atkomuligar. Í hesum liggur eisini hugsanin um innklusjón, ið er ein av meginreglunum undir grein 24 í ST sáttmálanum um rættindi teirra, ið bera brek, um rættin til útbúgving í eini innkluderandi útbúgvingarskipan á øllum stigum og læring fyri lívið.

Innklusjónshugtakið í skúlahøpi snýr seg um tilgongdina at økja luttøkuna hjá næmingum í og minka útihýsing frá undirvísing, mentan og samfelagi í staðbundna skúlanum; at umskipa mentan, politikk og mannagongdir í skúlanum, so tey svara til fjølbroytni næminganna á staðnum, at allir næmingar, ið eru í vanda fyri at verða útihýstir úr felagsskapinum, kunnu vera til staðar, taka lut og fáa frama, ikki bara tey við breki ella tey, ið eru roknað at "hava serligan undirvísingarligan tørv"[4][5].

Nógv kjak er um innklusjón, og fleiri allýsingar eru av hugtakinum, men fyri at innklusjón kann vera framd í verki í skúlanum, eru nøkur øki, ið mugu vera nøktað. Hesi eru: at vera fysiskt til staðar í "sínum" lokala stovni, at vera góðtikin og viðurkend bæði av starvsfólki og næmingum á stovninum, at taka virknan lut í virkseminum saman við hinum og at hava rúm fyri positivari

[4] Ainscow et al. (2006)

[5] ***Salamancayvirlýsingin*** frá 1994, ið er helst fyrsta altjóða skjal, ið eggjar til innkluderandi skúla, hevur eisini allýst innklusjón.

sjálvsmenning (fakliga, sosialt og viðvíkjandi persónsmensku)[6]. Í mun til integratión, sum meira snýr seg um at vera til staðar fysiskt saman við øðrum, so snýr innklusjón seg eisini um at vera góðtikin, viðurkend, at vera virkin og kunna mennast á staðnum.

At røkka hesum málum til fulnar fyri øll er ivaleyst ómøguligt, men miðað eigur at vera eftir at arbeiða miðvíst við innklusjónshugtakinum, so tað ber so langt fram á leið sum møgulig. Í hesi allýsing liggur, at ikki er nóg mikið bert at vera integrerað og vera tilstaðar, men eisini at vera virdur og eiga virknan leiklut í felagsskapinum. Hetta setir stór krøv til okkara skipan – m.a. at hugsa miðnám øðrvísi og at hugsa innklusjón í øllum gerandisdegi hjá tí unga, so hugtakið fær eitt veruligt innihald  fyri tann við serligum tørvi.

Í okkara grannalondum er ymiskt, hvussu mann hevur íverksett innklusjónshugtakið á miðnámsskúlaøkinum.  Í Danmark hevur mann m.a. eina serstaka STU lóg[7] fyri serliga skipaða útbúgving, sum eru serskild frá vanligu miðnámsskúlum, meðan mann í Íslandi ikki hevur nakran serskúla á miðnámsøkinum, men allir næmingar ganga á serbreytum og serskildum tilboðum, sum eru staðsett á vanligu miðnámsskúlunum. Tað, sum tó er felags fyri bæði ta íslendsku og donsku skipanina, er, at støðið verður tikið í førleikunum og evnunum hjá tí einstaka, og bæði undirvísingargongdin og stuðulsskipanin uttanfyri skúlan verður tillagað eftir hesum.

Tískil er tað eisini umráðandi, at myndugleikin, sum hevur ábyrgd av at veita og fíggja tænastuna, eisini tryggjar, at næmingurin, sum hevur serligu avbjóðingina, fær í boði tænastur og veitingar, sum hava til endamáls at tryggja og stuðla undir, at viðkomandi kann ganga í skúla á jøvnum føti við onnur ung.  Í hesum sambandi er grundreglan um kompensatión umráðandi, tí kompensatiónin er ein liður í at veita fólki við serligum avbjóðingum javnlíkar møguleikar.

Í mun til ***kompensatiónina*** eigur altíð í fyrstu atløgu at verið hugt at, hvat borgarin megnar sjálvur, og miðast skal altíð eftir at vera so tætt at tí vanliga sum møguligt. Neyðug atlit skulu takast at, at kompensatiónin ikki verður ov lítil ella ov stór, men at hon hevur fyri eyga at javnstilla tann við serligum tørvi við onnur. Hugsanin við kompensatión er ikki at veita sersømdir ella framíhjárættindi, men at javnstilla fólk við serligum tørvi við onnur. Sum dømi kann nevnast, at miðnámsskúlanæmingur, sum verður mettur at tørva 5 tímar um vikuna í stuðli, men annars megnar

---

[6] Farrell (2002)

[7] STU. Særlig Tilrettelagt Uddannelse. https://www.retsinformation.dk/Forms/R0710.aspx?id=158171

skúlagongdina, ikki fær onnur stuðulstilboð, sum ikki er tørvur á. Hinvegin hevur tað eisini stóran týdning, at næmingur, ið tørvar nógvan stuðul bæði innanvert skúlaskipanina og eftir skúlatíð, fyri at megna skúlagongdina fær neyðugu kompensatiónina.

Arbeiðsbólkurin hevur lagt stóra áherðslu á, at tilboðini og inntrivini vera samskipað. Serliga fyri henda málbólk hevur tað stóran týdning, at samanhangur er millum skúla-, frítíðar-, stuðuls- og bútilboð. Tilboðini mugu samskipast soleiðis, at tey inntrivini, sum verða gjørd fyri at kompensera fyri tann serliga tørvin, hanga saman, stuðla hvørt annað og mynda eina heild í gerandisdegnum hjá tí unga. At samskipan er neyðug, vísa m.a. royndir frá t.d. serflokki innan autismuøkið, har mann hevur gjørt royndir at samskipa stuðuls- og skúlapartin. Ávegis eftirmeting er gjørd viðvíkjandi hesum serflokki, og vísir hon á ein tørv at samskipa tilboðini betur. Eisini vísa royndirnar frá Rásini, at hetta tilboðið riggar væl, og er eftirspurningur javnan um at víðka um hetta tilboð, sum er samskipað av einum myndugleika. Hetta løgdu danir eisini stóran dent á undir vitjanini hjá arbeiðsbólkinum í Jyllandi.

Tá ið talan er um at ***samskipa*** tilboðini og at røkka øllum, er visitatiónstilgongdin ógvuliga týdningarmikil, soleiðis at mann fær víst á tað rætta tilboðið til tann einstaka. Tað hevur týdning, at atlit vera tikin at ***geiraábyrgdini*** millum ráðini, soleiðis at ráðini ábyrgdast fyri teirra ábyrgdarøki, tvs. at skúlaparturin er ábyrgdin hjá Mentamálaráðnum, meðan tað, ið er uttanfyri skúlatíðina, er ábyrgdin hjá Almannamálaráðnum.

Krumtappurin undir einari góðari skipan á miðnámsskúlaøkinum fyri ung við serligum tørvi er ein breitt samansettur og førleikamentur starvsfólkahópur. Tá ið miðað verður eftir serligum undirvísingartilboðum til henda málbólk í samstarvi við stuðuls- og/ella bútilboð, so má starvsfólkahópurin eisini hugsast í einum breiðum høpi.

## 2.0 TILMÆLINI Í HØVUÐSDRØGUM

Í tráð við høvuðsyvirskriftirnar frá meginreglunum mælir arbeiðsbólkurin til hetta:

1. Inkluderandi miðnámsskúlaskipan fyri ung við serligum tørvi
2. Skipa *Serliga skipað miðnám*[8] annaðhvørt sum serbreyt ella serflokkur við eini tilgongd, har eitt ella tvey nýggj tilboð vera sett á stovn á hvørjum ári alt eftir tørvi
3. Skúlatíðin er frá 8 – 13. Skipað undirvísing í skúlanum í lestrarfrídøgum o.t.
4. Stuðulsfyriskipanir í frítíðum, ferium o.ø. frídøgum
5. SSM skal skipast sum eitt samskipað tilboð við møguleika fyri 4 árum
6. Meginreglan er, at skúlabyrjan er við skúlaársbyrjan t.e. miðjan august, men møguleiki fyri at byrja seinni í skúlaárinum
7. Næmingurin skal fáa prógv, sum er grundað á OCN-skipan og sum vísir, hvørjar førleikar viðkomandi hevur.
8. Rásin hoyrir undir eitt ráð. Skúlaparturin fær við tíðini størri samstarv við SSM í økinum t.d. miðnámsskúlar í Klaksvík og á Kambsdali. Skipað sum eitt tvey ára skeið. Tekur næmingar inn á hvørjum ári. Tá ið Rásin er vorðin partur av SSM, kann búparturin gerast partur av Almannaverkinum.
9. SSM verður samskipað við stuðulsfyriskipanir og evt. bútilboð aftaná skúlatíð eftir mettum tørvi. Leisturin kann vera at skipa skúlatilboð og stuðulstilboð, skúla-, stuðuls- og frítíðartilboð ella skúla-, stuðuls-, frítíðar- og bútilboð ella skúla- og næmingaheim.
10. Virkisætlan, sum Almannaverkið ger og læruætlan, sum skúlin ger, skulu hanga saman.
11. Fjølbroyttur starvsfólkahópur við ymiskum førleikum, sum arbeiðir í toymi á SSM við toymisleiðara, sum virkar sum deildarleiðari fyri SSM.
12. Førleikamenna starvsfólkahópin so hvørt, sum tilboð verða stovnað, fyri at tryggja dygd og innihald. Møguliga skipað útbúgving/eftirútbúgving innan sernámsfrøði á Námsvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya.
13. Sernám, sum er miðstøð fyri sernámsfrøðiligari ráðgeving til fólkaskúlan, stendur fyri samskipan og at veita sernámsfrøðiliga ráðgeving. Miðnámsskúlaøkið á Sernámi má raðfestast og fíggjarlig orka setast av til hetta arbeiðið. Tryggjað má vera áhaldandi og skipað samstarv. Samskipari og mennari av skipanini verður staðsettur á Sernámi.

[8] Heitið SSM verður nýtt hereftir í tílmælinum, tá ið sipað verður til Serliga Skipað Miðnám.

14. Samlað og felags visitatión umboðandi skúlan, næmingurin kemur frá, miðnámsskúla, Almannaverkið og Sernám.
15. Vanligan lestrarstuðul (ÙS)[9] og møguligt ískoyti frá Almannaverkinum sambært almannalóggávu.
16. Mentamálaráðið tekur sær av skúlapartinum og Almannamálaráðið av tí, sum er uttanfyri skúlan.
17. Samanlagt skulu 120 skúlatilboð skipast í tíðarskeiðnum 2015-2018. Í Tórshavn verða 48 næmingar, á Kambsdali 24 næmingar, í Norðoyggjum 24 næmingar, í Suðuroy 12 næmingar og Rásin kemur at hava 14 næmingar.
18. Til hesi tilboð verða skipað mentortoymi, frítíðartilboð, frítíðarklubbtilboð og í ein avmarkaðan mun bústaðartilboð.
19. Lógarbroyting gerast í løgtingslóg nr. 67 frá 2. mai 2003 um skúlatilboð til ung við breki, sum broytt við løgtingslóg nr. 115 frá 18.desember 2008. Broytingar gerast í løgtingslógunum um SIT- og FHS. Uppskotini eru farin til hoyringar.

## 3.0 TØRVSLÝSING

Fyri at lýsa og staðfesta tørvin og kunna gera tilmælið um staðseting av tilboðum er neyðugt við neyvari tørvslýsing, og hava Almannaverkið og Sernám í felag greinað og lýst tørvin á tilboðum útfrá tí vitan, tey hava um hesar borgarar. Hetta skuldi gjørt tørvsmetingina rættiliga neyva, við tað, at tað ikki eru tey somu, sum eru í báðum skipanum. Tó skulu tølini vera tikin við ávísum fyrivarni, tí vit hava ikki nágreinilig hagtøl yvir brekøkið[10].

Tørvsmetingin er gjørd út frá, at málbólkurin er ung við serligum avbjóðingum, ið tarnar teimum í at gjøgnumføra eitt miðnámsskúlatilboð undir vanligum treytum við avmarkaðum sernámsfrøðiligum stuðli. Hetta merkir, at eru ung fólk, sum hava tørv á eitt nú 5 stuðulstímum um vikuna, men annars megna eina vanliga skúlagongd undir vanligum treytum, so eru hesi ikki fevnd av skipanini, sum bólkurin mælir til at stovnseta. Til henda tørv er t.d. kunngerðin um

---

[9] Møguliga eigur lestrarstuðulslógin at broytast.

[10] Sí frágreiðing um hoyringina av ST-sáttmálanum um tey, ið bera brek. http://www.mbf.fo/page.php?Id=44&l=fo

sernámsfrøðiligan[11] stuðul ætlað. Málbólkurin, sum hetta tilmælið snýr seg um, eru teir næmingar, sum hava tørv á einum meira serliga skipaðum skúlatilboði eftir lokið fólkaskúlaskeið.

Vit hava ongi neyv hagtøl, sum vísa tørvin, men mett verður, at umleið 3-4% av einum miðalárgangi á 700 ung hava serligan tørv, sum ger tey skikkað at taka serliga skipað miðnám. Hetta svarar til áleið 25-30 ung, sum kunnu hugsast at hava tørv á serliga skipaðum tilboðum. Tó vita vit, vísandi til at slík tilboð hava verið avmarkað í Føroyum áður, at tørvurin er størri enn hetta talið.

Tørvsmeting, sum Almannaverkið og Sernám hava gjørt av borgarum í aldrinum 16 til 25 ár, vísir, at 103 ung fólk ikki hava eitt skipað skúlatilboð. Nógv hava tó stuðulsfyriskipan ella tilboð um luttøku í frítíðarklubbi í Trivnaðardeplinum í Almannaverkinum, ella eru í arbeiðsroynd, játtað eftir lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk av Almannaverkinum.

Størsti einstaki bólkurin eru ung við menningartarni, tils. 48 fólk. Av hesum búgva 30 í Streymoynni og 12 í Eysturoynni.

Næststørsti bólkurin eru ung innan autismuøkið, tils. 33 fólk. Av hesum búgva 21 í Streymoynni og 5 í Eysturoynni.

Tørvurin á tilboðum er sostatt størst í Streymoynni, har samlaða talið er 57 borgarar, og í Eysturoynni, har samlaða talið er 28 borgarar. Í Norðoyggjum er talið 12, harav 5 við autismu, í Vágum 4, í Sandoynni 1 og í Suðuroynni 1.

Bólkurin av teimum, sum eru farin upp um fólkaskúlaaldur, t.e. ung fólk í aldrinum 17 – 25 ár, telur 64 persónar, harav 21 eru 17 ár.

42 persónar eru 16 ár og kunnu tí væntast at fara úr fólkaskúlanum í 2015.

35 persónar eru 15 ár og kunnu tí væntast at fara úr fólkaskúlanum í 2016.

---

[11] Kunngerð nr. 9 frá 22. juni 2000 um sernámsfrøðiligan stuðul til næmingar við likamligum ella sálarligum breki, sum broytt við kunngerð nr. 28 frá 6. mars 2001. http://www.logir.fo/foldb/kunfo/2000/0000094.htm

**<u>Niðurstøða:</u>** Tørvslýsingin staðfestir, at tað er stórur tørvur á tílíkum tilboðum, men at hann er óvanliga stórur nú, tí avmarkað tilboð hava verið. Roknað verður við, at árliga fara umleið 25-30 ung framyvir at hava tørv á serliga skipaðum tilboðum. Tørvslýsingin vísir, at størsti tørvurin er í Suðursteymoy og Eysturoy. Eisini kann væntast ein øktur tørvur í Norðoyggjum komandi árini.

**<u>Tilmæli:</u>** Útfrá tørvslýsingini verður mælt til, at tilboð til henda málbólk vera raðfest komandi ár at vera staðsett í Streymoy og Eysturoy. Slík tilboð eiga eisini komandi árini at vera raðfest í Norðoyggjum. Raðfestast eiga eisini slík tilboð í Suðuroy[12].

# 4.0 MIÐNÁMSSKÚLATILBOÐ

## 4.1 YVIRSKIPAÐUR BYGNAÐUR

Við støði í meginreglunum um innklusjón og kompensatión verður mælt til at stovnseta eitt *Serliga skipað miðnám, SSM*[13], sum í mestan mun verður staðsett á vanligu miðnámsskúlunum. Sambært § 24 í ST-sáttmálanum um rættindi fyri einstaklingar, ið bera brek, hava fólk við breki rætt til javnbjóðis møguleikar í eini innkluderandi útbúgvingarskipan á øllum stigum - og læring fyri lívið. Henda grundhugsan verður umrødd í arbeiðssetninginum hjá nevndini, og nevnt verður eisini, at skúlatilboðini í mest møguligan mun verða staðsett á miðnámsskúlum.

SSM fevnir um undirvísing á ***serbreyt***, sum ikki miðar eftir vanligum miðnámsprógvi, ella um undirvísing í ***serflokki***, ið kann miða eftir vanligum prógvi, men har næmingarnir, fyri at kunna fáa hóskandi undirvísing, mugu fáa undirvísing í minni bólki, har serlig atlit verða tikin at teirra breki. Flokkurin innan autismuøkið í Hoydølum er eitt dømi um ein serflokk.

***Serbreyt*** er ein nýggj breyt afturat teimum vanligu miðnámsskúlabreytunum. Serbreyt er eyðkend av, at hon ikki hevur vanligu upptøkukrøvini og ikki miðar eftir vanliga próvnum. Undirvísingin byggir á námsætlan, sum er gjørd til einstaka næmingin, og sum leggur dent á at duga at klára seg í dagliga lívinum, at læra okkurt bókmentaligt ella listarligt, teldunýtslu, handaligt arbeiði, eitt nú at

[12] Nærri lýst í kap. 4.

[13] Heitið *SSM* verður nýtt í tilmælinum og er ein stytting fyri *Serliga Skipað Miðnám*.

hjálpa til í køki ella at arbeiða í handli. Fyri at tryggja miðvíst arbeiði og innihald verður í størst møguligan mun miðað eftir OCN[14] ella líknandi prógvi.

Miðnámsskúlaskipanin er í dag býtt upp í seks breytir. Afturat vanligu breytunum skulu flestu – ella allir - miðnámsskúlar í Føroyum hava eina upp til 4 ára serbreyt, har næmingar í miðnámsskúlaaldri t.e. 16-25 ár, koma.

Eftir hagtølum og landafrøði skulu miðnámsskúlatilboð til næmingar við serligum tørvi verða staðsett í Streymoy, í Eysturoy, í Norðoyggjum, og um tørvur er á tí, eisini í Suðuroy. Miðnámsskúlaøkini eru Klaksvík, Kambsdalur, Marknagil[15] og Suðuroy. Á hvørjari av hesum miðnámseindum eiga *SSM* at verða stovnað. Samstarv skal verða ímillum hesi øki sínámillum og við Rásina alt eftir tørvi, sum við tíðini fær størri tilknýti til miðnámsskúlar í økinum.

Myndilin niðanfyri lýsir bygnaðin, sum arbeiðsbólkurin mælir til. Eftir fólkaskúla kunnu næmingarnir velja at fara beinleiðis á SSM ella á Rásina. Eisini eru aðrir møguleikar t.d. eru fyrireikingartilboð stovnsett.

---

[14] OCN stendur fyri Open Network College. Sí s. 15.

[15] Arbeiðsbólkurin brúkar heitið Marknagil, sum miðnámsskúlatilboðið í Tórshavn. Hóast miðnámsskúlarnir enn ikki eru savnaðir á einum staði, so hava vit valt at siga Marknagil, sum eftir ætlan verður liðugur í 2016. Mælt verður til, at SSM á Marknagili verður fyribils virkin á einum av núverandi eindum.

## 4.2 SERLIGA SKIPAÐ MIÐNÁM- SSM

Skotið verður upp at skipa bygnaðin fyri serliga skipað miðnám (SSM) fyri ung við serligum tørvi soleiðis, at ein nýggj breyt, *serbreyt*, kemur afturat verandi breytum, og møguleiki verður fyri *serflokkum*. Á SSM er møguleiki fyri at miða eftir heilum ella lutvís vanligum prógvi, meðan aðrir næmingar miða eftir einum øðrum prógvi.




Næmingar við serligum tørvi eru ymiskir, og tá miðnámsskúlarnir fara at hava SSM, er møguligt, at nakrir næmingar við serligum tørvi fara beinleiðis úr fólkaskúla inn á miðnámsskúla á serbreyt og kunnu har hava møguleika at fara inn í vanligar flokkar í einstøkum lærugreinum við hóskandi stuðli – alt eftir støði og førleika. Eisini verður møguleiki at skipa serflokkar, sum miða eftir vanligum prógvi við serliga skipaðum kringumstøðum, m.a. við møguleika fyri at taka miðnám yvir longri tíð, t.d. 4 ár.

## 4.3 SKÚLATÍÐIN OG TÍÐIN, SKIPAÐ VIÐ STUÐULSFYRISKIPANUM

Mett verður, at skúlatíðin í SSM skipanini verður frá 8 – 13, og tað, sum fevnir um stuðulsfyriskipanir fyriskipað av Almannaverkinum, fevnir um tíðina aftaná kl. 13. Mælt verður til, at skúlatíðin á serbreyt heldur fram, tá aðrir næmingar hava lesifrí, og í serflokki verður skúlatíðin skipað øðrvísi hetta tíðarskeiðið tá ið lesifrí o.a. er. Tørvur er tá á, at næmingarnir eru í skúlanum saman við toyminum, sum er um SSM. Mælt verður eisini til, at stuðulsfyriskipanin heldur fram í ferium. Tætt samstarv má vera millum ymsu fyriskipanirnar.

## 4.4 HØLISVIÐURSKIFTI

Serliga skipað miðnám krevur eyðvitað egið høli, har serbreytin og/ella serflokkar kunnu halda til. Tað er alneyðugt, at hóskandi høli verða tøk og gjørd til endamálið á teim miðnámsskúlunum, har mælt verður til, at SSM verða staðsett.  Sum er, er gongd á bygging og útbygging, og verður mælt til, at hædd verður tikin fyri tørvinum á hølum, sum eru gjørd til endamálið á Marknagilsdeplinum, á Kambsdali og á Tekniska skúla í Klaksvík.

Eins og SSM skipanin skal hugsast øðrvísi enn vanligt miðnám, so er eisini alneyðugt, at hædd verður tikin fyri, at hølini, har hesi tilboð skulu hýsast, eisini mugu hugsast øðrvísi enn “vanlig” flokshøli á miðnámsskúlunum. Hølini mugu innrættast til endamálið, og hevur tað týdning, at fleiri smærri høli eru, har undirvísingin kann fara fram í smærri bólkum, og at einstakur næmingur kann fara í egin høli, um tørvur er á tí. Eisini hevur tað týdning, at hølini eru eitt sindur vard í mun til fjøldina í skúlunum, samstundis sum hølini skulu liggja tætt upp at  felagsøkjunum í skúlanum fyri at betra um innklusjónsmøguleikarnar. Tað merkir, at næmingarnir  skulu kunna vera fyri seg sjálvan eftir tørvi, og samstundis eftir førimuni lættliga kunna vera saman við øðrum og vera við í felagsskapinum.

Hetta hevur við sær, at høli eiga at vera sett av beinanvegin í teimum útbyggingum, sum nú eru ígongd á Kambsdali, á Tekniska skúla í Klaksvík og í Marknagilsdeplinum. Alneyðugt er, at hædd verður tikin fyri, at hóskandi høli vera tøk og gjørd til endamálið, so hvørt sum SSM byrja komandi árini. Hædd má takast fyri hesum í verandi og komandi byggiætlanum.

## 4.5 INNIHALD

SSM má vera sera breitt, so tað kann taka allar næmingar uttan mun til førleikar. Fyri summar næmingar er talan um at byggja víðari á bókligan førleika, og fyri aðrar at fyrireika til handaligt arbeiði. Uppaftur aðrir næmingarnar hava t.d. stórar avbjóðingar at menna sosialar førleikar og samskiftisførleikar. Í stuttum má undirvísingin lagast einstaka næminginum.

Hetta setur eisini onnur og stór krøv til fólkaskúlan, har næmingarnar hava gingið. Umráðandi er, at fólkaskúlin ger eina neyva lýsing av øllum førleikum, møguleikum og avbjóðingum hjá næminginum. Hetta má vera so ítøkiligt, at miðnámsskúlin veit, hvussu næmingurin, sum byrjar á miðnámi, er fyri sum heilt menniskja, og út frá hesum kann gera ítøkiligar einstaklingsætlan. Førleikastova skúlans og Sernám samstarva eftir tørvi um hesa lýsing.

Við støði í hesi frágreiðing, øðrum tøkum upplýsingum og eygleiðing av førleikunum hjá einstaka næminginum má gerast ein persónlig námsætlan, ið leggur dent á at røkja og menna teir førleikar, ið næmingurin hevur við sær. Har afturat er umráðandi at menna nýggjar førleikar eftir evnum og áhuga næmingsins.

Miðnámsskúlin skal á hvørjum ári gera eina heildarmeting av einstaka næminginum og eina menningarætlan fyri komandi árið og hvørt menningarátak. Serbreytin hevur sín egna profil, sum merkir, at hann er lagaður eftir einstaka næminginum. Regluligt samskifti við heim og stuðulsfyriskipanir er sjálvsagt alneyðugt fyri at menna heildina í tilboðnum.

Serbreytin eigur at kunna víðkast til 4 ár, har summir næmingar fyrsta árið brúka part av tíðini til at menna sosialar og persónligar førleikar eftir OCN-skipanini – tað er við denti á sína egnu sjálvsfatan og samspælið við umhvørvið og samfelagið sum heild. Í øðrum førum kann vera gagnligt at hava 4 ára skúlagongd, ið kann vera meira vinnurættað fyri at styrkja um møguleikarnar at koma út á arbeiðsmarknaðin eftir lokna skúlagongd.

Royndir í grannalondum okkara hava víst, at tað í fleiri førum ikki er neyðugt at bólka næmingar eftir diagnosu, men heldur eftir námsfrøðiliga tørvinum og virkisførleikanum. Hóast næmingar hava ávísa diagnosu, eru teir so ymiskir sum menniskju, at vit mugu ikki lata diagnosuna geva okkum eina stereotypa fatan av næminginum, men heldur síggja hann sum tann einstakling, hann er. Tað merkir, at t.d. næmingar innan autismuøkið kunnu vera í lítlum flokki/bólki saman við næmingum við aðrari diagnosu t.d. ADHD, tí tey hava gagn av somu sernámsfrøði við skipaðum og

forútsigiligum viðurskiftum. Á teimum skúlum vit vitjaðu, bæði í Íslandi og í Danmark, løgdu tey dent á góðar royndir við hesum.

## 4.6 PRÓGV

Tað hevur stóran týdning, at skúlagongdin hjá næmingunum hevur eitt veruligt innihald og er førleikamennandi og gevandi, og talan ikki einans verður um uppihald - ella innklusjón uttan innihald. Tískil verður mælt til, at hvør einstakur næmingur fær prógv, sum sigur, hvørjar førleikar hann hevur. Hetta prógv skal, har tað ber til, vera grundað á OCN-skipanina, sum er ein viðurkend skipan. Talan kann vera um fakligar-, verkligar- og aðrar førleikar, sum kann vera við til at tryggja, at næmingurin fær møguleika at gerast so sjálvstøðugur sum gjørligt eftir lokna útbúgving. Næmingar, ið megna at taka einstakar lærugreinir á vanligum miðnámsstigi, fáa sjálvsagt prógv fyri hetta sambært galdandi reglum, t.d. sum stakgreinaprógv.

## 4.7 OCN - OPEN COLLEGE NETWORK

Arbeiðsbólkurin hevur kannað, hvussu gjørt verður aðrastaðni við tey, sum ikki megna at fáa eitt vanligt prógv. Her tykist OCN-skipanin[16], sum m.a. verður brúkt í summum skúlum í Danmark, at vera eitt sera gott boð.

OCN (Open College Network)[17] skipanin byggir upprunaliga á at útbúgva fólk til praktiskt arbeiði, har alt virksemi kann greinast í ymisk førleikastig, sum skulu eftirmetast, og so hvørt geva møguleika at fara víðari. Fyrsta stigi er grundleggjandi kunnleiki, annað stigi er førleikin at loysa eina uppgávu, og triðja stigi er førleikin at loysa eina uppgávu sjálvstøðugt og eftirmeta.

Grundhugsanin við OCN-skipanini er at kunna skjalprógva allar førleikar, sama um teir eru fingnir innanfyri ella uttanfyri skúlagátt. Skipanin kann skjalprógva førleikar á øllum stigum og verður viðurkend bæði í vinnulívi og á útbúgvingarøkinum. Í Bretland viðurkenna enntá universitet OCN-stig sum upptøkugrundarlag. OCN skipanin hevur síðani breitt seg til eisini at fevna um persónligar- og sosialar førleikar, so hvørt sum skipanin er tikin í brúk á nýggjum økjum.

---

[16] Sí: www.ocndanmark.dk. Sí eisini stuttan film um OCN frá TV2 Østjylland (4 min). http://www.tv2oj.dk/arkiv/2013/11/21/42170?autoplay=1

[17] Tók seg upp í Bretlandi fyrst í 1980-unum og hevur síðani breitt seg víða. Sviar tóku OCN skipanina til sín stutt eftir aldamótið, og í Danmark var farið undir OCN-skipanina í 2007.

OCN Danmark hevur til dømis ein pakka við 43 ymiskum OCN eindum, sum fevna um sosiala- og persónliga læring, eitt nú “Persónligt reinføri”, “Mál og samskifti”, “Bólkaarbeiði og bólkasamanseting” umframt fleiri vinnurættað skeið, t.d. “Køkur og kantina” ella “Bilrøkt”. Ein styrki í OCN skipanini er, at tað er vinnan sjálv, sum dygdarmetir og góðkennir tey einstøku vinnurættaðu OCN-skeiðini.

Við limaskapi í t.d. OCN Danmark fæst atgongd til øll tey skeið, sum eru til, í løtuni 1710 ymiskar OCN eindir í 273 virknum lærutilgongdum[18]. Nógvar aðrar OCN-gongdir eru eisini, men hesar eru tiknar við í fylgiskjøl sum dømi. Nýggj skeið koma alla tíðina afturat, so hvørt sum einstakir næmingar vísa á nýggjan tørv. Nýggjar OCN eindir verða gjørdar soleiðis, at teir lærarar, ið hava tørv á eini nýggjari eind, gera eitt uppskot til innihald. Síðani verður hetta uppskot gjøgnumgingið saman við eini serligari nevnd, sum OCN Danmark hevur sett – ella setir eftir tørvi. Henda nevnd ger neyðugar broytingar, so at innihaldið verður soleiðis, sum vinnan krevur. OCN hevur fleiri slíkar nevndir fyri ymisk yrki og øki, sum so eru trygd fyri fakliga innihaldinum.

Ein møguleiki kundi verið, at Føroyar tekna limaskap hjá OCN Danmark og harvið fáa atgongd til donsku OCN-skipanina. Bólkurin mælir tó til, at miðað verður eftir, at viðkomandi OCN-gongdir verða týddar til føroyskt, og har tað er neyðugt, verða lagaðar til føroysk viðurskifti.

Almannaverkið ger í dag sosialfakliga heildarmeting og virkisætlan til at førleikameta borgarar við. Henda skipan metir eisini um førleikar hjá tí einstaka og týdningarmikið er, at ein møgulig OCN-skipan og virkisætlan arbeiða saman soleiðis at samskipan og samanhangur er millum førleikametingina av skúlapartinum og førleikametingina av stuðulsfyriskipanunum[19].

## 4.8 TILMÆLI UM AT BROYTA RÁSINA

Ein liður í arbeiðssetninginum hjá bólkinum var at koma við tilmæli um at víðka og broyta Rásina. Sum nú er, er Rásin eitt heildartilboð við undirvísing, frítíðarvirksemi og bústaði, serliga ætlað ungum við menningartarni. Rásin er skipað við heimild i løgtingslóg um skúlatilboð til ung við breki[20]. Pláss hevur verið fyri 7 næmingum, og hava hesir gingið í skúla í trý ár. Rásin er partur av málsøkinum hjá Mentamálaráðnum, og hevur spurningurin, undir hvørjum ráði Rásin skal liggja,

---

[18] Fylgiskjal 2 og 3 vísa lista yvir OCN-gongdir á økjunum “Persónligir og sosialir førleikar” og “Vinna og arbeiðslív”.

[19] Fylgiskal 5 vísir dømir um ADL førleikametingar.

[20]Lógin um Rásina: http://www.logir.fo/foldb/llofo/2003/0000067.htm.

Reglugerð fyri Rásina: http://www.rasin.fo/joomla/index.php?option=com_content&view=article&id=51&Itemid=53

verið umrøddur við jøvnum millumbili. Orsøkin er, at næmingarnir á Rásini búgva á staðnum, og at teir í stóran mun verða undirvístir í búvenjing, arbeiðsvenjing og í størri mun í at menna persónligar- og sosialar førleikar, og tí at tann meira bókfakliga undirvísingin ikki hevur fylt eins nógv. Spurningur er javnan settur við, um virksemið hjá Rásini ikki er meira í tráð við kjarnu uppgávuna hjá Almannaverkinum, og at Rásin tí heldur skuldi verið partur av málsøkinum hjá Almannamálaráðnum.

Bólkurin hevur umrøtt spurningin, hvussu Rásin kann skipast framyvir, so at virksemið kann víðkast og møguliga verið býtt sundur, so at skúlaparturin bleiv ábyrgdin hjá Mentamálaráðnum og búparturin ábyrgdin hjá Almannamálaráðnum. Hetta eisini soleiðis, at meginreglan um geiraábyrgd verður fylgd.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at Rásin verður varðveitt sum heildartilboð undir eini leiðslu, at skúlin framhaldandi heldur til í Saltangará, og at tað framhaldandi verður málsøkið hjá Mentamálaráðnum. Tó skal Almannaverkið vera við til at umsita bíðilistan og visitatiónina til búpartin á Rásini. Leiðarin á Rásini eigur at vera partur av visitatiónini til búplássini á Rásini. Hetta er ikki heilt í tráð við yvirskipaðu meginregluna um innklusjón og geiraábyrgd og tilmælið, sum annars mælir til, at fleiri skúlatilboð verða skipað innanvert vanligu skipanini. Bólkurin er av teirri fatan, at tað hevur stóran týdning, at skúlin, sum hevur virkað sera væl higartil, verður varðveittur og víðkaður, samstundis sum orka eisini verður nýtt til at skipa fleiri og onnur tilboð á teimum vanligu miðnámsskúlunum.

Bólkurin mælir tó til nakrar broytingar. Málbólkurin hjá Rásini verður víðkaður soleiðis, at næmingar við øðrum avbjóðingum enn menningartarni fáa møguleikan at ganga í skúlanum. Royndir seinasta skúlaskeiðið hava víst, at næmingar við øðrum avbjóðingum hava trivist væl saman við næmingum við menningartarni – báðum pørtum at gagni. Mælt verður tí til, at málbólkurin fyri Rásina verður víðkaður. Hetta samsvarar eisini við royndirnar í teimum skúlum, vit vitjaðu, bæði í Íslandi og í Danmark[21].

Bólkurin mælir eisini til, at aldursmarkið, sum nú er 18 ár, verður broytt til ung eftir fólkaskúla, og at visitatiónin til skúlapartin á Rásini verður saman við visitatiónini til onnur skúlatilboð í SSM-skipanini.

---

[21] Sí fylgiskjal1.

Eisini mælir bólkurin til, at skúlatíðin verður broytt soleiðis, at næmingar kunnu ganga á Rásini í mesta lagi 2 ár og ikki trý, sum nú er. Orsøkin er, at tað í størri mun skal miðast eftir, at næmingar á Rásini kunnu fara víðari á SSM á vanligu miðnámsskúlum eftir lokið skúlaskeið har, og at tað skuldi verið størri møguleiki fyri hesum, nú fleiri SSM tilboð verða skipað kring landið.

Harumframt mælir bólkurin til, at næmingar verða tiknir inn hvørt ár, so at samlaða næmingatalið verður 14 ella meira og ikki 7 sum nú er. Hetta krevur størri høli, og tí mælir bólkurin til, at taka 7 næmingar inn í 2015 og samstundis fara undir eina tilgongd við at útvega/byggja størri høli soleiðis, at 14 næmingar ella meira kunnu hýsast á Rásini.

Bólkurin er samdur um, at miðast eigur eftir at knýta undirvísingarpartin á Rásini meira til SSM skipanirnar á miðnámsskúlunum í økinum, har summi møguliga kunnu fylgja vanligu miðnámsundirvísingini í einstøkum lærugreinum. Møguleiki eigur bæði at fara víðari í SSM á vanligu miðnámsskúlunum og/ella at fara inn á eina fyrireikingartilgongd til arbeiðslív t.d. eftir leistinum í OCN skipanini. Tá ið næmingar á Rásini eru førur fyri at fara á miðnám eftir eitt ella tvey ára skeið, koma tey inn á SSM, har summi møguliga kunnu fylgja vanligu miðnámsundirvísingini í einstøku lærugreinum. Tey, sum ikki ætla á SSM, fara inn á eina fyrireikingartilgongd til arbeiðslív t.d. eftir leistinum í OCN skipanini.

Eisini er bólkurin samdur um, at tá tíðin er búgvin, og tá SSM skipanin er komin í fasta legu og nøktandi tilboð eru á miðnámsskúlunum kring landið, tá vera uppaftur fleiri møguleikar at knýta skúlapartin á Rásini til SSM skipanina kring landið. Tá verður búparturin á Rásini lagdur til Almannaverkið at umsita eins og Almannaverkið fær leiðsluna av búpartinum.

**Niðurstøða:** Við støði í meginreglunum um innklusjón og kompensatión verður mælt til at stovnseta eitt serliga skipað miðnám, SSM, sum í mestan mun verður staðsett á vanligu miðnámsskúlunum. Undirvísingin og kringumstøðurnar eiga at verða lagað til tørvin hjá tí einstaka, og undirvísingin kann annaðhvørt verða skipað á serbreyt ella í serflokki. Rásina verður varðveitt, sum tað heildartilboð, tað er, men aldursmarkið verður broytt, og tíðarskeiðið avmarkað til í mesta lagi tvey ár. Visitatiónin til Rásini eigur at vera broytt, so at hon fylgir leistinum á SSM. Við tíðini eigur Rásin at fáa størri tilknýti til miðnámsskúlar eftir SSM skipanini í økinum. Hvør einstakur næmingur eigur at fáa prógv, sum sigur, hvørjar førleikar hann hevur. Um talan ikki er um eitt vanligt prógv, skal ein skjalaváttan ella prógv vera grundað á OCN-skipanina ella aðra líknandi skipan.

Neyðugt er at hava hóskandi høli tøk, so hvørt sum SSM skipanin á teimum ymsu skúlunum byrja.

**Tilmæli:** Mælt verður til at seta á stovn ein yvirskipaðan bygnað fyri miðnám fyri ung við serligum tørvi, nevnt SSM við serbreytum og serflokkum. Mælt verður til, at Rásin verður varðveitt, sum tað heildartilboð tað er, sum við tíðini verður víðkað og fær tættari tilknýti til SSM skipanina í vanligu miðnámsskúlunum í økinum. Mælt verður til, at SSM kann umfata vanligt prógv ella eitt OCN-líknandi prógv/skjalaváttan.

Mælt verður til at raðfesta týdningin av hølum innanvert vanligu miðnámsskúlunum til hesa skipan.

## 5.0 STARVSFÓLK

Grundleggjandi spurningurin er, hvussu innkluderandi læruumhvørvi verður tryggjað og harvið fær ment fakliga støðið hjá øllum næmingum. ”Dansk Clearinghouse”[22] hevur m.a. gjørt eitt skipað granskingaryvirlit av altjóða kanningum um innklusjón av næmingum við avbjóðingum, sum vísir, at innklusjón kann styrkja læringina hjá øllum næmingum. Men um innklusjónin skal eydnast, er kravið, at skúlastjórar, lærarar og onnur starvsfólk, sum arbeiða við innklusjón, umframt viðurkennandi hugburð, hava vitan um undirvísing av næmingum við avbjóðingum og eisini hava møguleika at venda sær til fakfólk, sum kunnu vegleiða og stuðla arbeiði teirra.

Ein skipan er altíð treytað av teimum, sum starvast har. Tilmælið um tað sernámsfrøðiliga økið innan fólkaskúlan[23] vísir eisini á, at tað hevur stóran týdning at vera tilvitaður um, at krumtappurin í eini vælvirkandi sernámsfrøðiligari skipan er fakfólkini og tað menniskjaliga tilfeingið.

Arbeiðsbólkurin metir, at starvsfólk, sum eiga at vera um næmingar við serligum tørvi á miðnámi, kunnu eitt nú vera: Miðnámsskúlalærarar, fólkaskúlalærarar, námsfrøðingar, heilsufrøðingar, fysio- og ergoterapeutar og heilsuhjálparar/heilsuatstøðingar.. Umframt hetta kann eisini vera brúk fyri fólki við yrkisfakligari útbúgving. Hóast lønarviðurskifti helst mugu vera í samsvari við avvarðandi yrkisfeløg, so er sera umráðandi, at allir fakbólkarnir fáa javnstillað setanarkor. Her verður m.a. hugsað um lutfallið millum undirvísing og fyrireikingartíð. Best hevði verið, um øll vóru sett eftir somu treytum. Helst hevur hetta við sær, at starvsfólkaavtalur mugu gerast fyri hetta nýggja økið.

---

[22] Dyssegaard, Larsen & Tiftikçi: *Effekt og pædagogisk indsats ved inklusion af børn med særlige behov i grundskolen. Systematisk review*. Clearinghouse Forskningsserien 2013, nr. 13, Aarhus Universitet, København 2013

[23] Tilmælið um tað sernámsfrøðiliga økið, juni 2014. Mentamálaráðið.

Mælt verður til, at starvsfólkið, sum er um næmingar á SSM, arbeiða sum toymi. Hvør SSM skipan hevur SSM-leiðara ella samskipara, undir leiðslu skúlans.

Á SSM verður sum meginregla undirvísing, sum byggir á vanligar upptøkutreytir, og miðar eftir vanligum miðnámsprógvi, veitt av miðnámsskúlalærara. Undirvísing, ið byggir á aðrar fortreytir, og/ella miðar eftir øðrum prógvi, verður veitt av øðrum fakbólkum.

Undirvísingartímarnir, sum verða játtaðir til SSM, eiga at verða játtaðir eftir sama leisti sum í fólkaskúlanum og á miðnámi, t.v.s. játtað eftir lýsta undirvísingartímatalinum umframt tímar til røkt, fyrireiking, toymissamstarv og annað virksemi.

Í miðal skal starvsfólkaorkan vera í minsta lagi 1:3 - t.e. eitt starvsfólk til tríggjar næmingar. Hetta er sett út frá teirri sannroynd, at í summum førum ber til at hava bólkaundirvísing við kanska 5-6 næmingum, meðan tað í øðrum førum má vera 1:1 og enntá onkuntíð 2 starvsfólk til ein næming. Á Tøkniskúlanum í Reykjavík vóru t.d. 14 starvsfólk til 7 næmingar, soleiðis at ein serlærari og ein stuðul vóru saman um hvønn næming. Hetta var tann tyngsti bólkurin. Á Fjølbreytaskúlanum í Ármúla í Reykjavík vóru 15 starvsfólk til 30 næmingar, helvtin við sernámsfrøðiligari útbúgving og helvtin ófaklærdir stuðlar. Fjølbreytaskúlin í Breiðholti, sum hevði teir lættastu næmingarnar, hevði størri bólkar og tveylæraraskipan – og bara serútbúgvin starvsfólk. Eisini verður ein sokallað ***mentorskipan*** brúkt í Íslandi, har “vanligir” næmingar átaka sær uppgávuna at vera hjálparfólk hjá einum næmingi við serligum tørvi. Tað kann vera at vera saman við teimum í vanliga umhvørvinum t.d. í fríkorteri ella matarsteðgi, at fylgja í skúla ella til hús o.a. Næmingar kunnu fáa samsýning fyri hetta arbeiðið.

Skúlarnir, vit vitjaðu í Danmark, høvdu líknandi starvsfólkaorku. Til dømis hevði Knudmoseskúlin í Herning 30 starvsfólk til 85 næmingar. Tað er ógrundað at vænta, at vit kunnu geva eins dygdargott skúlatilboð uttan at hava sama lutfall, tvs. í minsta lagi 1 lærara fyri hvørjar 3 næmingar í miðal.

## 5.1 KRØV TIL ÚTBÚGVING

Serkunnleiki á økinum er týðandi fyritreyt fyri at tryggja fakliga dygd í arbeiðnum – sum er øðrvísi enn undirvísing á “normaløkinum”. Tí er sera umráðandi at fáa sett starvsfólk við sernámsfrøðiligari útbúgving. Í Íslandi er sernámsfrøði ein 2 ára eftirútbúgving, sum bæði námsfrøðingar og lærarar taka, og á teimum skúlum, vit vitjaðu í Reykjavík, høvdu flestu starvsfólk slíka útbúgving. Á

teimum skúlum, vit vitjaðu í Danmark, hava eisini flest øll starvsfólk sernámsfrøðiliga eftirútbúgving. Hetta krav er eyðvitað eisini galdandi hjá okkum.

Fyri at fáa fakliga dygd í tey SSM tilboð, sum komandi árini verður mælt til at stovna, mæla vit til, at eitt ára eftirútbúgving í sernámsfrøði verður sett á stovn á Námsvísindadeildini sum skjótast. Innanfyri eitt tíðarbil á umleið 5-10 ár eigur hetta at vera víðkað til eina 2 ára útbúgving í sernámsfrøði, so vit koma á hædd við tann sernámsførleika, sum grannalond okkara brúka. Hesar eftirútbúgvingar eiga at vera bæði fyri lærarar og námsfrøðingar – og møguliga aðrar fakbólkar eisini. Henda útbúgving kemur við tíðini bæði at gagna fólkaskúla og miðnámi. Miðað eigur eisini at vera eftir, at fólk, sum longu eru í starvi á økinum, kunnu fáa sær eftirútbúgving við síðuna av starvinum yvir longri tíðarskeið.

Tey SSM tilboð, sum mælt verður til at byrja longu á heysti 2015, fáa eyðvitað ikki fyrsta árið gagn av nýggju eftirútbúgvingini. Tað er tó sera umráðandi, at tey fáa okkurt slag av grundleggjandi skeiði at byrja við, bæði í sernámsfrøði sum heild og í at nýta OCN-skipanina, um avgerð verður tikin um at nýta hesa ella líknandi skipan.

Áður nevnda **granskingarfrágreiðing** hjá Dansk Clearinghouse[24], sum er ein metagreining, ið gjøgnumgongur og samanber alla kenda gransking í heiminum á hesum øki, leggur stóran dent á, at ein treyt fyri, at innklusjón skal bera til, er, at undirvísararnir hava dyggan fakligan førleika og møguleika at ráðføra seg við serfrøðingar á økinum. Mælt verður staðiliga til, at ein sovorðin útbúgving verður sett á stovn í Føroyum.

ST sáttmálin sigur nevniliga, at fyri at tryggja nøktandi skúlatilboð í verki, skulu limalondini taka hóskandi stig til at seta lærarar í starv og at útbúgva serfrøðingar og starvsfólk, sum arbeiða á øllum skúlastigum. Slík útbúgving skal eisini gera starvsfólkini tilvitandi um brek og læra tey at brúka hóskandi hjálpartól og alternativan arbeiðshátt, miðlar og snið í samskifti, frálæringarhátti og tilfari sum stuðul til fólk, ið bera brek.

## 5. 2 SERNÁMSFRØÐILIG RÁÐGEVING

Tað hevur týdning, at sernámsfrøðiliga tænastan innan SSM skipanina byggir á samskipan, og ikki minst, at sernámsfrøðilig ráðgeving verður knýtt at SSM skipanini. Í Føroyum er tað Sernám, sum veitir, sbrt. fólkaskúlalógini §4, stk. 5 og 6 sernámsfrøðiliga ráðgeving til skúlar, foreldur og

[24] " Effekt og pædagogisk indsats ved inklusion af børn med særlige behov i grundskolen".

onnur, ið varða av nemingum í fólkaskúlanum. Eisini kann henda tænasta verða veitt børnum undir skúlaaldur.  Sernám veitir sernámsfrøðiliga ráðgeving, vegleiðing og stuðul, soleiðis at børn og ung (0-18 ár) kunnu styrkjast í menningini, sum umfatar sosiala, kropsliga, persónliga, málsliga og kognitiva menning.

Sum er, er ongin skipað sernámsfrøðilig ráðgeving knýtt at miðnámsskúlunum, men royndirnar við at skipa sertilboð á miðnámsskúlaøkinum hava víst, at tørvur er á í størri mun at fáa sernámsfrøðiliga ráðgeving knýtta at tílíkum sertilboðum. Heldur enn at seta á stovn nýggja skipan, verður mælt til, at virkisøki hjá Sernámi verður víðkað til eisini at fevna um miðnámsskúlaøkið við serligum atliti at SSM.  Flestu nemingar, sum hava tørv á SSM, eru í skipanini hjá Sernámi frammanundan. At fáa miðsavnað vitanina og at kunna byggja brýr millum skúlaskipanir og stuðulsskipanir er júst ein av hornasteinunum undir verkætlanini *Tann góða tilgongdin*[25], sum júst er farin av bakkastokki.  At stovnseta eina SSM skipan krevur, at skipanin verður samskipað og ankrað í sernámsfrøðiligum høpi, og tí metir arbeiðsbólkurin, at samskipari av hesi skipan verður raðfest og stovnsett. Mælt verður somuleiðis til, at samskipari verður settur at skipa, veita ráð og fylgja gongdini, tá ið SSM tilboð verða sett á stovn. Mælt verður til, at samskipari við sernámsfrøðiligum fakkunnleika verður staðsettur og ankraður í Sernámi.

Til hesa uppgávu og aðrar uppgávur innan sernámsfrøðiliga økið á miðnámi er alneyðugt, at serstøk játtan fylgir við og verður markað til økið.

**<u>Niðurstøða:</u>** Tørvur er á fjølbroyttum starvsfólkahópi til SSM. Tørvur er á miðnámsskúlalærarum, fólkaskúlalærarum, námsfrøðingum, heilsufrøðingum, fysio- og ergoterapeutum og heilsuhjálparum umframt starvsfólki við yrkisfakligum førleikum. Mælt verður til, at starvsfólkið, sum er um nemingar á SSM, arbeiða sum toymi við toymisleiðara ella deildarleiðara fyri hesa skipan.

Serkunnleiki á økinum er týðandi fyritreyt fyri at tryggja fakliga dygd í arbeiðnum – sum er øðrvísi enn undirvísing á “normaløkinum”. Tørvur er á út- og eftirútbúgving í sernámsfrøði, og mælt verður til at seta slíka eftirútbúgving á stovn á Námsvísindadeildini. Lærarafelagið og Pedagogfelagið hava víst á, at nógvir av teirra limum hava serkunnleika innan serøkið.

Tað hevur alstóran týdning, at sernámsfrøðilig ráðgeving verður knýtt at miðnámsskúlunum. Bólkurin metir, at tað er skynsamast, at Sernám fær samskipandi og ráðgevandi leiklutin. Um

[25] http://www.amr.fo/arbeidsoki/brek/tann-goda-tilgongdin/

Sernám skal hava hetta virkisøkið, er alneyðugt, at serstøk játtan fylgir við og verður markað til økið.

**Tilmæli:** Mælt verður til fjølbroyttan starvsfólkahóp, sum verður skipað í toymi á SSM tilboðum. Mælt verður til at raðfesta fakligan førleika innan serøkið bæði við verandi fakfólki og við at skipa fyri út- og eftirútbúgving av starvsfólki á Námsvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum.

Mælt verður til, at Sernám stendur fyri samskipan og sernámsfrøðiligu ráðgevingini, sum mælt er til skal knýtast at miðnámsskúlaøkinum.

## 6.0 BÚ- OG STUÐULSFYRISKIPANIR

Áður hevur tilmælið viðgjørt skúlatilboð og heildartilboðið Rásina. Ung við serligum tørvi hava eisini tørv á fyriskipanum uttanfyri skúlatíð - eitt nú stuðuls- og bútilboð og eru hesi tilboð í dag málsøkið hjá Almannamálaráðnum og verða veitt av Almannaverkinum. Tilboðini eru skipað við heimild í forsorgarlógini og í mun til hetta tilmælið, verður í størri mun talan um at útbyggja verandi skipanir við fleiri tilboðum heldur enn at stovnseta nýggjar skipanir. Bólkurin hevur tískil valt at lýsa núverandi tilboð, sum metast at vera viðkomandi fyri henda málbólk.

### 6.1 STUÐULSFYRISKIPANIR AV TÝDNINGI FYRI MÁLBÓLKIN TIL SSM

Tá borgarar, sum hava tørv á endurmenning í mun til arbeiðsføri og/ella gerandisdagin venda sær til Almannaverkið, verða tey víst til Menningardepilin. Menningardepilin veitir stuðul til arbeiðsfremjandi tiltøk, hjálparráð, fyritíðarpensjón o.a. Er tørvur á øðrum tænastum, sum bú- ella stuðulsskipan, verður skipað fyri visitatión til tænasturnar, sum Trivnaðardepilin veitir. Visitatiónin er út frá einari tørvsmeting við støði í sosialfakligari heildarmeting[26]í mun til tøk tilboð. Virksemið í Trivnaðardeplinum er skipað í eindir, sum eru býttar upp eftir breki og landafrøði. Stuðlar og stovnar verða skipaðir undir somu leiðslu. Tænasturnar verða veittar við heimild í forsorgarlógini. Almannaverkið miðar eftir at tilluta tilboðini eftir meginregluni um kompensatión Soleiðis at tryggjað verður, at tilboðið stendur mát við brekið hjá viðkomandi. Hetta merkir, at miðað verður altíð eftir at gera so litið inntriv í gerandisdagin hjá borgaranum sum gjørligt, samstundis sum

[26] Sí fylgiskjal 4.

tryggjað verður, at borgarin fær neyðuga hjálp. Harafturat vigar atlitið til ynski hjá borgaranum tungt, tá Almannaverkið tillutar tilboðini. Er tað soleiðis, at Almannaverkið útfrá fakligum metingum mælir til, at borgarin tekur av einum stuðli í gerandisdegnum og, borgarin sjálvir sigur nei, so hevur Almannaverkið ikki heimild til at tvinga viðkomandi til at taka av tilboðnum. Sama ger seg galdandi, tá ræður um bútilboð. Tekur borgarin ikki av einum tilboði, so kann Almannaverkið ikki tvinga viðkomandi at taka av, hóast sosialfakliga metingin vísir, at viðkomandi hevur tørv á bútilboðnum.

Stuðulsfyriskipanir við heimild í forsorgarlógini hava sum endamál at virka fyri, at heimabúgvandi borgarar í mest møguligan mun kunnu liva eitt sjálvstøðugt og virkið lív. Virksemið kann vera í heiminum og uttanfyri heimið. Arbeitt verður við at geva borgarunum ein tryggan, skipaðan og mennandi gerandisdag, og neyðuga vegleiðing og umsorgan.

## 6.2 VIRKIS-, STUÐULS- OG FRÍTÍÐARTILBOÐ Á TRIVNAÐARDEPLINUM

10 verkstaðs- og virkistilboð eru kring alt landið fyri tey yvir 18 ár. Á hvørjum ári fáa nakrir borgarar boðið pláss á verkstaðs- ella virkistilboðunum. Bíðilisti er til hesi tilboð.

Eitt ungdómstoymi er í Havn fyri ung 14-20 ár við aspergersyndromi. Ungdómstoymið møtist hvønn týsdag kl. 16.00-19.00 og annanhvønn fríggjadag kl. 16.00-22.00. Vanlig visitering er til hesi tilboð.

Frítíðarklubbar eru í Tórshavn og Eysturoy 1-2 kvøld um vikuna fyri borgarar yvir 18 ár við menningartarni. Øll kunnu koma í frítíðarklubb. Her er ongin visitering ella bíðilisti.

Frítíðarklubbi “Jollyklubb” er í Havn fyri borgarar við menningartarni 14-18 ár 2 ferðir um vikuna. Jollyklubbur er eitt samlingsstað, har ein kann møta sínum javnlíkum við møguleika fyri at knýta vinabond. Endamálið er at fyrireika og geva ungum við menningartarni frítíðartilboð, sum líkist teimum, ið ung fólk annars hava í síni frítíð. Øll kunnu koma í Jollyklubb og har er ongin visitering ella bíðilisti.

Eitt mentortoymi er til tey, sum ganga í serflokki í Hoydølum. Hetta er ætlað næmingum innan autismuøkið, sum ganga í serflokkinum. Tillutað eru 25 tímar um vikuna í mentortoyminum[27] til 6

[27] ***Mentortoymið*** verður í tilmælinum nýtt sum heitið á stuðulsskipan, sum verður veitt næmingunum eftir skúlatíð, men kann vera í skúlanum ella aðrastaðni.

næmingar. Ætlanin við toyminum er at stuðla undir, at næmingarnir megna at gjøgnumføra útbúgvingina. Ongin visitering er til hetta tilboðið, tí tað fatar um øll tey, sum ganga í flokkinum.

“Fjálvi” er ein kafé, sum er eitt tilboð til ung við sálarsjúku. Hetta er skipað sum eitt tilboð, ein kann nýta eftir ynski. Fjálvi er karmur um fjølbroytta samveru í einum umhvørvi, har dentur er lagdur á tryggleika, lívsvirði og at fremja sosiala samveru millum brúkararnar. Opið er í dagtímunum gerandisdagar og nøkur kvøld um vikuna. Øll kunnu koma í Fjálva og har er ongin visitering ella bíðilisti.

Tilhaldsstaðið “Gloym meg ei” í Gøtu er fyri fólk við sálarsjúku. Brúkarin er við til at mynda staðið. Her er møguligt at luttaka í ymiskum handaligum virksemi, ymiskum borðspølum umframt sosialari samveru og práti. Opið er gerandisdagar í dagtímunum. Øll kunnu koma í tilhaldsstaðið og har er ongin visitering ella bíðilisti.

Annars eru nógvar ymiskar vanligar stuðulsfyriskipanir, har einstaklingar einsæris hava stuðul eitt ávíst tímatal um vikuna. Hetta er stuðulstilboð, sum eru ætlað borgarum, sum búgva heima hjá foreldrunum ella í egnari íbúð ella aðra staðni, t.d. á einum “vanligum næmingaheimi”.

## 6.3 BÚTILBOÐ

26 sambýli eru kring landið. Vanlig visitering er til hesi búpláss.

Nakrir búfelagsskapir eru kring landið. Búfelagsskapir eru ætlaðir fólki, sum hava tørv á minni hjálp og stuðli enn tey, sum búgva á sambýli. T.d. er ongin náttarvakt í búfelagsskapum. Vanlig visitering er til hesi bútilboð.

Tvey bú- og virkistilboð eru í Tórshavn. Annað fyri fólk við autismu, og hitt fyri fólk við menningartarni. Vanlig visitering er til hesi tilboð. Heimildin at skipa bú- og virkistilboð er § 27 í forsorgarlógini, sum kom í gildi 1.8.2013. Heimildin fevnir um persónar, sum fyribils hava tørv á sosialpedagogiskum tilboði á bú- og virkisstovni. Bú- og virkistilboðið í Børkugøtu í Tórshavn er skipað sum bú- og virkistilboð, og miðar Almannaverkið eftir at skipa fleiri § 27 tilboð, tí tørvur er á slíkum.

## 6.4 NÝGGJ SAMSKIPAÐ SKÚLA- OG STUÐULSTILBOÐ Í SAMBAND VIÐ SKIPAN AV SERLIGUM MIÐNÁMI

Tá talan er um at gera samskipað skúla- og stuðulstilboð til teirra, sum fara at brúka nýggju miðnámsskúlatilboðini (SSM), verður sostatt neyðugt at seta í verk/víðka stuðuls- og frítíðartilboð til tey heimabúgvandi og bútilboð til teirra, sum hava tørv á tí. Orsakað av, at tilboðini verða veitt í mun til tørvin og tí, at Almannaverkið hevur eina røð av ymiskum tilboðum, er torført at siga nágreiniliga hvørji tilboð skulu skipast og hvussu nógv. Tískil skulu niðanfyri nevndu tilmæli takast við einum ávísum fyrivarni.

<u>Talan kann vera um:</u>

- Mentortoymi virkar sum eitt stuðulstoymi, har nøkur starvsfólk í felag stuðla einum ávísum bólki við teimum avbjóðingum, sum vísa seg í mun til skúlatilboðið. Tey røkja tó ikki uppgávur, sum skúlin natúrliga eigur, t.d. lektiukafe, skrivi- og lesitrupulleikar og líknandi.
- Stuðulstilboð: 1 til 1 tilboð.
- Frítíðartilboð eru aftaná skúlatíð t.v.s. frá kl. 13 og til uml. kl. 17.00. Tilboðið eigur at vera rættað teimum, sum hava miðnámsskúlatilboð. Innihaldið eigur at vera av slíkum slagi, at tað stuðlar undir, at borgarin megnar at gjøgnumføra skúlan (somu undantøk sum mentortoymið), at skapa vinalag, felagsskap og sosiala førleikamenning. Tilboðið skal stuðla undir, at borgarin í mest møguligan mun mennist til eitt sjálvstøðugt lív. Bólkurin hevur umrøtt møguleikan fyri, at frítíðartilboðini eftir skúlatíð í størri mun enn higartil verða hýst í hølum á vanligu ungdómshúsunum kring landið. Á henda hátt verða ung við serligum tørvi inkluderað í vanliga ungdómsumhvørvið. Møguliga eru hølir á ungdómshúsunum, sum í dag standa tóm í tíðarskeiðnum 13-17, og tískil kunnu húsini gagnnýtast betur enn í dag. Harumframt er ongin loyna, at tað er trupult at finna hóskandi hølir til virksemið hjá Almannaverkinum, sum er klárt at taka í nýtslu.
- Frítíðarklubbar 1-2 kvøld um vikuna. Innihald: felagsskapur, vinarlag og sosial menning.
- Bútilboð: Bú- og viðgerðartilboð (§ 27). Er fyribilsbúskipan har borgarin, umframt búfyriskipanina er í einum menningartilboði uttan fyri stovnin. Hetta kann til dømis vera SSM ella arbeiðsfremjandi tiltak, ella vera ein tilgongd, har arbeitt verður fram móti menningar- ella útbúgvingarætlan. Innihaldið er persónlig og sosial menning. Tilboðið, sum er knýtt at SSM eigur at stuðla undir, at borgarin megnar at gjøgnumføra skúlan, og at borgarin í mest møguligan mun mennist til eitt sjálvstøðugt lív. Bólkurin hevur umrøtt

møguleikan fyri, at høli fáast til vega á teimum vanligu næmingaheiminum, sum eru kring landið, soleiðis, at næmingar við serligum tørvi eisini í størri mun verða innkluderað í vanligu tilboðini eftir skúlatíð. Eisini eigur politiski myndugleikin at tryggja, at rúm verður fyri næmingum við serligum tørvi, tá farið verður undir tilgongdina við at byggja/útvega fleiri lestarbústaðir í Føroyum. So kann Almannaverkið veita stuðulstilboð til viðkomandi næmingar soleiðis, at hesir fáa búleikast á jøvnum føti við onnur ung.

- Hjá nøkrum kann talan vera um, at neyðugt er at skipa heildagstilboð, har skúli og Almannaverk skipa allan dagin saman, so hesi ikki skulu vera á fleiri støðum gjøgnum dagin. Hetta kundi verið staðsett í einum skúla. Bólkurin hevur umrøtt, at skúlin á Trøðni, sum hevur høli, ið eru bygd til endamálið – og sum standa tóm og óbrúkt stóran part av degnum – kundi verið nýttur til heildartilboð. Eisini hevur bólkurin umrøtt møguleikan fyri, at nýggi stovnurin í Runavík fyri børn og ung við fjølbreki kundi verið nýttur til heildagstilboð. Talan kann t.d. vera um borgarar, sum hava fjølbrek ella autismu, og sum illa megna at skifta umhvørvi.
- Sum er hevur Trivnaðardepilin ikki pening til nýggj tilboð í verandi fíggjarkørmum. Tí er ein fortreyt fyri, at niðanfyristandandi tilboð kunnu setast í verk, at peningur verður játtaður til hesi tilboð, sum ikki rúmast í verandi játtan.

**Niðurstøða:** Neyðugt er at veita teimum, sum nýta serliga skipað miðnám (SSM), stuðuls- og frítíðartilboð til tey heimabúgvandi og bútilboð til teirra, sum hava tørv á tí. Almannaverkið/ Trivnaðardepilin hevur ikki pening til nýggj tilboð ella at víðka um verandi tilboð í verandi fíggjarkørmum. Ein fortreyt fyri, at tilboðini frá Almannaverkinum kunnu setast í verk er, at peningur verður játtaður til hesi tilboð.

**Tilmælið:** Mælt verður til at seta í verk stuðuls- og frítíðartilboð til tey heimabúgvandi og bútilboð til teirra, sum hava tørv á tí. Talan kann eisini vera um mentortoymi, sum virkar sum eitt stuðulstoymi, frítíðartilboð, sum eru aftaná skúlatíð frá kl. 13 og til uml. kl. 17.00, frítíðarklubbar 1-2 kvøld um vikuna og bú- og viðgerðartilboð, sbrt 27 í forsorgarlógini. Mælt verður til at finna fígging til hesi tilboð[28].

[28] Sí fíggjarmetingina.

## 7.0 TILGONGDIN AT STOVNA OG STAÐSETA FLEIRI SKÚLA-, STUÐULS-, FRÍTÍÐAR OG BÚTILBOÐ

Út frá lýsingunum og tilmælum, sum eru nevnd higartil í tilmælinum, er bólkurin komin fram til tilmæli um eina tilgongd at stovna og staðseta fleiri skúla-, stuðul-, frítíðar- og bútilboð. Tilgongdin, sum lýst er, fevnir yvir 3 ár.

### 2015:

- Rásin tekur upp 7 næmingar og farið verður undir at útvega størri hølir soleiðis, at Rásin kann víðkast í 2016.
- Serflokkur í Hoydølum (10 næm).
- SSM skipan á Kambsdali ( 8  næm ).
- Serbreyt á Tekniska skúla í Tórshavn, evt í samstarvi við Handilsskúlan(10 næm). Inntil skúlabyggingin í Marknagili er liðug, verður tann parturin av serbreytini, ið er ætlaður næmingum við fjølbreki, staðsettur á skúlanum á Trøðni í Tórshavn.
- Uml. 10 bústaðartilboð í Tórshavn skipað sum bú- og viðgerðartilboð eftir § 27 í forsorgarlógini. Tað kann t.d. vera næmingaheim ella búfelagsskapur við sosialpedagogiskum stuðulsskipanum.
- Møgulig bústaðartilboð í Eysturoynni skipað sum bú – og viðgerðartilboð eftir § 27 í forsorgarlógini um tørvur er á tí.
- Mentortoymi á Kambsdali
- Mentortoymi í Tórshavn
- Skipa ella víðka frítíðartilboð, sum eru aftaná skúlatíð t.v.s. frá kl. 13 og inntil uml. kl. 17.00.
- Skipa ella víðka Frítíðarklubbar 1-2 kvøld um vikuna.
- OCN- skipanin stovnsett.
- Fara undir eina tilgongd at  førleikamenna starvsfólkið munandi, harundir útbúgving og eftirútbúgving  innan sernámsfrøði
- Sernám fær samskipandi og ráðgevandi leiklutin í mun til SSM skipanina.

## 2016:

- Serbreyt á Tekniska skúla í Klaksvík (10 næm)
- Rásin tekur 7 næmingar
- SSM á Kambsdali (8 næm)
- SSM skipað í Marknagilsdeplinum, har serbreytin á Tekniska skúla í Tórshavn og serflokkurin í Hoydølum verða staðsett. Serbreytin víðkað (10 næm).
- Møgulig bústaðartilboð á næmingaheiminum í Klaksvík skipað sum bú- og viðgerðartilboð eftir §27 í forsorgarlógini til tey, sum ganga í skúla á Tekniska Skúla í Klaksvík, um tørvur er á tí.
- Mentortoymi í Klaksvík
- Mentortoymi á Kambsdali
- Skipa ella víðka frítíðartilboð, sum eru aftaná skúlatíð t.v.s. frá kl. 13 og til uml. kl. 17.00.
- Skipa ella víðka frítíðarklubbar 1-2 kvøld um vikuna.
- Førleikamenningin av starvsfólki heldur fram

## 2017:

- Rásin tekur upp 7 næmingar fyri tey, ið byrjaðu í 2015
- SSM á Kambsdali (6 næm)
- SSM í Klaksvík (8 næm)
- SSM í Marknagilsdeplinum (18 næm. annaðhvørt á serbreyt ella serflokki)
- SSM í Suðuroy (5 næm eftir tørvi)
- Uml. 10 bústaðartilboð í Tórshavn skipað sum bú- og viðgerðartilboð eftir § 27 í forsorgarlógini. Tað kann t.d. vera næmingaheim ella búfelagsskapur við sosialpedagogiskum stuðulsskipanum
- Møgulig bústaðartilboð í Suðuroy skipað sum bú- og viðgerðartilboð eftir § 27 í forsorgarlógini um tørvur er á tí. [29]
- Mentortoymi á Kambsdali
- Mentortoymi í Klaksvík
- Mentortoymi í Suðuroy

---

[29] Har eru nøkur næmingaheim, sum eru ætlaði teimum, sum ganga á skúladeplinum í Hovi og annars hevur Økisdepilin fyri sálarsjúk í Vági eisini íbúðir.

- Skipa ella víðka frítíðartilboð, sum eru aftaná skúlatíð t.v.s. frá kl. 13 og inntil uml. kl. 17.00
- Skipa ella víðka frítíðarklubbar 1-2 kvøld um vikuna
- Førleikamenning av starvsfólki heldur fram

## 2018:

- Rásin tekur upp 7 næmingar fyri tey, ið byrjaðu í 2016
- SSM á Kambsdali (8 næm)
- SSM í Marknagilsdeplinum (10 næm).
- SSM í Klaksvík (6 næm)
- SSM í Suðuroynni (3 næm eftir tørvi)
- Mentortoymi á Kambsdali
- Mentortoymi í Tórshavn
- Mentortoymi í Klaksvík
- Skipað ella víðkað frítíðartilboð, sum eru aftaná skúlatíð t.v.s. frá kl. 13 og inntil uml. kl. 17.00.
- Skipað ella víðkað frítíðarklubbar 1-2 kvøld um vikuna

Samanumtikið mælir bólkurin til, at tað samanlagt verða áleið 120 skúlatilboð til ung við serligum tørvi í Føroyum og svarar hetta til tørvin, sum er uml. 30 ung fólk um árið og tá hædd verður tikin fyri, at skúlagongdin er 4 ár. Talan er um samanlagt uml. 14 næmingar á Rásini t.v.s. 7 næmingar um árið, uml. 24 næmingar í Norðoyggjum t.v.s. áleið 6 næmingar um árið, uml. 24 næmingar á Kambsdali t.v.s. 6 næmingar um árið, uml. 48 næmingar í Marknagilsdeplinum t.v.s. 12 næmingar um árið og uml. 12 næmingar í Skúladeplinum í Hovi t.v.s. uml. 3 um árið.

Í mun til tilgongdina at skipa tilboðini, so er atlit eisini tikin at minka um stóra tørvin, sum er í dag orsakað av, at nærum ongi tilboð hava verið. Fyrsta árið verða 35 næmingar tiknir inn, annað árið 33 nýggir næmingar, triðja árið 37 nýggir næmingar og fjórða árið 27 nýggir næmingar.

Tilmælið byggir í høvuðsheitum á meginreglurnar um innklusjón og geiraábyrgd, men atlit eru eisini tikin til staðbundna tørvin og hølisviðurskifti. Samstundis eru atlit eisini tikin til týdningin av, at stundir eru at menna starvsfólkahópin so hvørt, sum tilboð verða stovnað, fyri at tryggja dygd og innihald. Tað hevur tó eisini vigað eitt sindur, at tað eru nakrir skúlar (Rásin, Studentaskúlin í

Hoydølum og Tekniski skúlin Tórshavn) sum hava royndir við at skipa hesi tilboð og tískil skulu hesir ikki byrja úr ongum.

Í mun til hesi viðurskifti, so eru trý tilmæli, sum liggja uttanfyri og sum bólkurin, metir krevja eina grundgeving.

1. Arbeiðsbólkurin mælir til, at Rásin verður varðveitt sum heildartilboð undir eini leiðslu, at skúlin framhaldandi heldur til í Saltangará, og at tað framhaldandi verður málsøkið hjá Mentamálaráðnum. Hetta er ikki í tráð við yvirskipaðu meginregluna um innklusjón og geiraábyrgd og tilmælið, sum annars mælir til, at fleiri skúlatilboð verða skipað innanvert vanligu skipanini. Bólkurin er av teirri fatan, at tað hevur stóran týdning, at skúlin, sum hevur virkað sera væl higartil, verður varðveittur og víðkaður, samstundis sum orka eisini verður nýtt til at skipa fleiri og onnur tilboð á teim vanligu miðnámsskúlunum. Tá ið fleiri SSM tilboð eru skipað á vanligum miðnámsskúlunum, og virksemið á Rásin er víðkað, so eigur spurningurin aftur at vera viðgjørdur, um virksemið møguliga skuldi verið býtt sundur soleiðis, at skúlaparturin bleiv ábyrgdin hjá Mentamálaráðnum og búparturin ábyrgdin hjá Almannamálaráðnum soleiðis, at meginreglan um geiraábyrgd verður fylgd.

2. Mælt verður til at skipa part av serbreytini á Tekniska skúla í Tórshavn á skúlanum á Trøðni, og brýtur hetta við meginregluna um innklusjón, um at staðseta SSM innanvert vanliga skúlan. Bólkurin hevur vitjað skúlan á Trøðni og er av teirri fatan, at hølini á skúlanum á Trøðni, sum eru bygt til endamálið, eiga at verða gagnnýtt, nú farið verður undir at skipa fleiri tilboð, hóast hetta ikki er í tráð við innklusjónstankan sum so. Hølini á skúlanum á Trøðni standa tóm stóran part av degnum, og metir bólkurin, at hølini, sum eru serstakliga væl egnað við svimjihyli, venjingarhølum og nógvum stórum skúlastovum, er ein kapasitetur, sum fleiri eiga at fáa gleði av. Møguleiki eigur eisini at vera kannaður um nýggi stovnurin í Runavík fyri fólk við fjølbreki kundi hýst skúlapartinum. Hølini eru bygd til endamálið, og fyri at forða fyri, at ung við fjølbreki skulu flytast ov nógv millum stovnar og støð í gerandisdegnum, kundi hetta verið ein loysn. Hetta var ein loysn, sum leiðarin á Fjølbreytaskúlanum í Ármúla nevndi, var alt ov lítið brúktur, men sum kundi verið skilagóður at nýtt, júst til ung við fjølbreki. Omanfyri nevndu loysnir er kanska serliga viðkomandi nú, áðrenn nýggju miðnámsskúlarnir er lidnir og vónandi bygdir til hetta endamál eisini.

3. Bólkurin hevur, hóast tørvslýsingin vísir, at í løtuni er ongin tørvur á tilboðum í Suðuroynni, eisini tikið atlit til, at børn við serligum tørvi í Suðuroynni í størri mun enn aðrastaðni í landinum flyta av oynni, tí avmarkað tilboð eru til teirra. Vísandi til, at ein nýggjur skúladepil við miðnámsskúla og heilsuskúla er í Suðuroynni, og at Almannaverkið hevur stuðuls- og bútilboð í Suðuroynni, so hevur bólkurin mælt til, at tilboð verða skipað í Suðuroynni.

Í mun til tilboðini, sum liggja aftaná skúlatíð t.v.s. aftaná kl. 13 so er ilt at siga nágreiniliga, hvørji og hvussu nógv tilboð skulu skipast hvar. Sum er, hevur Almannaverkið eina røð av tilboðum og givið er, at fleiri av teimum, sum fara at fáa skúlatilboð, longu fáa tilboð frá Almannaverkinum. Tískil verður tað ikki fyrrenn visitatiónin er framd at ein greið mynd fæst av, hvørji tilboð tørvur er á og hvar hesi skulu skipast. Tað er tó greitt, at tørvur verður á fleiri tilboðum so sum mentortoymum, frítíðartilboðum, frítíðarklubbum og bútilboðum.

Almannaverkið hevur tó eisini ein bíðilista til bútilboð - serliga í høvuðsstaðarøkinum og tískil kann tað gerast trupult at veita bútilboð til henda málbólk. Eisini kann vera bíðilisti til frítíðartilboð Harafturat skal nevnast, at sum er hevur Almannaverkið ikki fígging til at veita fleiri tilboð og tískil má hægri játtan til skulu fleiri tilboð útvegast.

## 8.0 VISITATIÓNSTILGONGD

Bólkurin mælir til, at øll skulu hava møguleika at velja og søkja sær eina hóskandi miðnámsútbúgving eftir fólkaskúlan og at øll skulu viðgerast á jøvnum føti, tá umsóknirnar verða viðgjørdar. Fyri at tryggja rættartrygdina hjá borgaranum við at syrgja fyri, at øll verða viðgjørd á jøvnum føti, og fyri at tryggja tilboðini verða skipað so væl sum gjørligt er neyðugt, at visitatiónin til skúlatilboð er so breið og neyv sum møguligt.

Mælt verður til, at umsóknir um serliga skipað miðnám verða viðgjørdar í einum visitatiónsbólki, sum verður mannaður við umboðum fyri Sernám, miðnámsskúlarnar og Almannaverkið. Viðkomandi fólkaskúli, har næmingurin hevur gingið, skal luttaka í visitatiónini av ávísa næminginum. Sbrt. verandi lóggávu um Rásina er tilskilað í **§ 7,** at treytin fyri at verða upptikin sum næmingur er, at viðkomandi hevur fylt 18 ár og er egnaður at luttaka í undirvísingini. Leiðarin av skúlatilboðnum ger av saman við ráðgevandi bólkinum[30], hvør ið verður upptikin. Mælt verður til at henda greinin verður broytt, so at upptøkan til skúlapartin á Rásini verður viðgjørd saman við upptøkuni av hinum tilboðunum.

Visitatiónsbólkurin skal viðgera umsóknir til SSM út frá meginregluni um minsta inntriv. Niðanfyri er lýst eitt boð um, hvussu visitatiónstilgongdin kann skipast.

Fyrst skal støða takast til, um umsøkjarin megnar eitt tilboð í vanligu miðnámsskúlaskipanini

- hevur viðkomandi eitt talprógv?
- hevur viðkomandi eitt avmarkað talprógv?
- megnar viðkomandi vanligt tilboð
    - við sernámsfrøðiligum stuðli?
    - við einari mentorskipan?
    - um skipað verður brúgv til fyrrverandi fyriskipan?

Eru hesar treytir ikki loknar, so verður næsta stig í tilgongdini at kanna, um umsøkjarin møguliga kann megna eitt tilboð í vanligu miðnámsskúlaskipanini, um hann fær bjóðað eitt fyrireikingarskeið t.d. í sertilboði.

---

[30] Í ráðgevandi bólkinum fyri Rásina eru ávíkavist 1 umboð fyri foreldrini, 1 fyri Almannamálaráðið og 1 fyri Mentamálaráðið (er ásett í §6, stk. 2 í lógini um Rásina).

- hvussu skal eitt nøktandi fyrireikingarskeið skipast?
    - undirvísing
    - bútilboð – íbúð, nætingaheim, bútilboð sbrt. § 27 í forsorgarlógini – møguliga við stuðli
    - stuðulsfyriskipan
    - annað

Í hesum førum skal ein fyrireikingarætlan gerast til hvønn einstakan næming.

Verður heldur ikki mett, at umsøkjarin, hóast eitt fyrireikingarskeið, megnar eitt tilboð í vanligu miðnámsskúlaskipanini er talan um SSM í serflokki ella á serbreyt..

Visitatiónsbólkurin skal síðani meta, um umsøkjarin hoyrir til málbólkin hjá skúlanum, hann hevur søkt inn á.

Bólkurin skal harnæst meta, um umsøkjarin hevur tørv á at søkja Almannaverkið um bútilboði ella stuðulsfyriskipan fyri at megna skúlan.

- bútilboð sbrt. § 27 í forsorgarlógini, vanlig næmingaheim
- mentorskipan, stuðulsfyriskipan, frítíðartilboð
- fyrireikingarskeið á Rásini

Bólkurin skal eisini meta, um serlig viðurskifti forða fyri, at tilboð kann veitast

- um so er, skal bólkurin ráðgeva umsøkjaranum og familjuni í mun til forðingina. Tað kundi verið t.d. um viðgerðarstovn fyri misnýtslu, sálarliga viðgerð ella annað, sum kundi hjálpt viðkomandi til seinni at megna útbúgvingartilboð

Visitatiónsbólkurin ger síðani uppskot til útbúgvingarætlan saman við umsøkjaranum – hvat skal til fyri, at ætlanin skal eydnast.

Bólkurin skal um neyðugt skipa fyri eftirmeting av útbúgvingarætlanini hjá tí einstaka – t.d. eftir eitt fyrireikingarskeið .

**Niðurstøða:** Tað er alneyðugt at hava skipaða visitatión, og at henda er so breið og neyv sum møguligt. Hetta eisini fyri at tryggja, at øllum stendur í boði at søkja somu tilboð og vera viðgjørd á jøvnum føti og undir somu treytum. Umsóknir um serliga skipað miðnám skula verða viðgjørdar í einum visitatiónsbólki, sum verður mannaður við umboðum fyri Sernám, miðnámsskúlarnar og Almannaverkið. Viðkomandi fólkaskúli, har næmingurin hevur gingið, skal eisini luttaka í visitatiónini av ávísa næminginum. Mælt verður til, at lógarbroyting verður gjørd í verandi lóggávu fyri Rásina, so at upptøkan til skúlapartin á Rásini verður viðgjørd saman við upptøkuni av hinum tilboðunum. Visitatiónsbólkurin ger uppskot til útbúgvingarætlan saman við umsøkjaranum og eina metan av, hvat skal til fyri, at ætlanin skal eydnast. Bólkurin skal um neyðugt fyriskipa eftirmeting av útbúgvingarætlanini hjá tí einstaka.

Tað hevur alstóran týdning, at sernámsfrøðilig ráðgeving verður knýtt at miðnámsskúlunum. Bólkurin metir at tað er skynsamast, at Sernám fær samskipandi og ráðgevandi leiklutin. Um Sernám skal hava hetta virkisøkið, er alneyðugt, at serstøk játtan fylgir við og verður markað til økið.

**Tilmæli:** Mælt verður til eina skipaða visitatión til skúlatilboðini í SSM umboðandi Sernám, miðnámsskúlarnar, Almannaverkið og viðkomandi skúla, har næmingurin hevur gingið. Mælt verður til, at upptøka til Rásina verður partur av samlaðu visitatiónini.

## 9.0 SAMSKIPAN

Eins og víst varð á í innganginum og í arbeiðssetningum, hevur tað alstóran týdning, at tilboðini sum verða veitt ungum við serligum tørvi av ymiskum myndugleikum verða samskipað og í størri mun samanhangandi. At samskipa og miða eftir at tryggja eitt heildartilboð skal tó ikki bróta við meginregluna um geiraábyrgd. Tískil hevur tað stóran týdning, at myndugleikarnar hvør í sínum lagi taka ábyrgd fyri sínum øki, og hvør í sínum lagi gera sítt til at samskipa við aðrar myndugleikar á økinum.

Bólkurin er av teirri fatan, at grundleggjandi fyritreytin fyri, at tað skal eydnast ungum við serligum avbjóðingum at gjøgnumføra eina SSM útbúgving er, at skúla og stuðulstilboðini sum liggja aftaná skúlatíð, verða samskipað, og at arbeitt verður í felag og miðvíst fram ímóti málinum. Tískil er tað altumráðandi, at samanhangur er millum politisku ætlanirnar á skúlaøkinum og á almannaøkinum. Tískil mælir bólkurin til, at landsstýrisfólkini hvør í sínum lagi, men tó í felag, tryggja neyðugar karmar fyri at skapa fleiri skúla, frítíðar- og stuðuls/bútilboð samstundis, og bólkurin mælir heldur til at skapa færri tilboð, um so er, at báðir partar ikki fáa nøktandi karmar at arbeiða undir. Tískil eiga landsstýrisfólkini í felag at tryggja sær, at politisk undirtøka er fyri tilmælinum, fyri at skapa neyðugar karmar at arbeiða undir, so tilmælini kunnu setast í verk.

Harafturat mælir bólkurin til, at Mentamálaráðið og Almannamálaráðið framhaldandi arbeiða saman og samstundis við at fremja tilmælini og fyri at tryggja áhaldandi samskipan.

Eisini mælir bólkurin til, at meira ella minni formligt samstarv verður skipað millum stovnarnar, tvs. Almannaverkið, Sernám og skúlaleiðslurnar. Samskipan millum skúlatilboðið og stuðulsfyriskipanirnar er alneyðug, og tað hevur stóran týdning, at áhaldandi samskifti er millum skúlan og tey tilboð, ið vera veitt av Almannaverkinum eftir skúlatíð. Ein føst skipan við at samskipa læruætlan frá skúlanum og virkisætlan frá Almannaverkinum er neyðugt, fyri at hesar hanga saman og eru samskipaðar. Toymisfundir eiga at vera regluliga millum hesar skipanir. Skotið verður upp 1 ferð um mánaðin í minsta lagi. Í gerandisdegnum mugu møguligir trupulleikar í einari skipan og sum krevja samstarv við hina skipanin vera møguligir at loysa skjótast til ber. Smidligar loysnir eru ógvuliga týdningarmiklar í hesum samstarvi og samskipan. Samstarv og samskifti við Sernámsfrøðiligu skipanina má eisini í fasta legu.

Fyri at tryggja áhaldandi samskipan er neyðugt at hava samskipan á ráðsstig, tvs millum AMR og MMR, og millum stovnarnar, tvs. Almannaverkið, Sernám og skúlaleiðslurnar.

## 10.0 FÍGGJARVIÐURSKIFTI HJÁ NÆMINGUNUM

Vísandi til meginregluna um innklusjón, geiraábyrgd og kompensatión hevur bólkurin umrøtt spurningin, um næmingar í SSM eiga at fáa ÚS[31] eftir vanligum reglum, sum onnur ung, ið ganga á miðnámi. Møguliga við hægri upphædd sum kompensatión til teirra, sum ikki kunnu arbeiða eftir skúlatíð vegna skerdan førleika[32].

Flestu í málbólkinum til SSM hava rættindi í mun til lógina um arbeiðsfremjandi tiltøk og lógina um almannapensjónir. Í báðum førum snýr tað seg um rættin til kompensatión fyri skerdan arbeiðsførleika. Samanhangurin er, at eru møguleikar at seta í verk fyriskipanir, ið meira enn fyribils bøta um arbeiðsevnini, ella er møguleiki at útvega, eitt eftir viðurskiftunum hjá viðkomandi, hóskandi arbeiði, er heimild at játta stuðul til hesar fyriskipanir sbrt. lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk. Eru útlit ikki til, at arbeiðsevnini varandi kunnu betrast, og at viðkomandi kann koma í eitt hóskandi arbeiði, er heimild at játta fyritíðarpensjón.

Verður tað so, at SSM gevur rætt til ÚS, so varðveita hesir næmingar sama rætt til stuðul eftir lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk sum onnur við skerdum arbeiðsførleika. Hesin bólkur hevur óivað rætt til hægri veiting enn onnur í sama aldri, tí tey koma undir ásetingina í § 13 stk. 3 "Tá talan er um persónar, sum hava umfatandi arbeiðstarn og djúptøknar persónligar og sosialar trupulleikar, kann víkjast frá treyt sbrt. stk. 2". T.e. ásetingini at lesandi í útbúgvingaraldri ikki fáa veiting til aldurssvarandi útbúgving. Móttakarar av veiting eftir lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk skulu um møguligt søkja stuðul eftir lóg um lestrarstuðul, og verður hesin mótroknaður veitingini.

Søkir ein av næmingunum um fyritíðarpensjón, og Almannaverkið ikki metir, at til ber at betra arbeiðsevnini við SSM ella øðrum fyriskipanum, hevur viðkomandi sostatt rætt til fyritíðarpensjón og ikki arbeiðsbúgving. Lestrarstuðul verður goldin út óskattaður, og tískil ávirkar hann ikki pensjónútgjaldið. Lestrarstuðulin verður hinvegin javnaður í mun til aðra inntøku, tó ikki fyrr enn inntøkan fer upp um 20.000 kr. um mð.

**Niðurstøða:** Næmingar í SSM fáa ÚS eftir vanligum reglum, sum onnur ung. Møguliga við hægri upphædd sum kompensatión til teirra, sum ikki kunnu arbeiða eftir skúlatíð vegna skerdan førleika.

---

[31] Ll nr.36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul, sum seinast broytt við Ll nr. 49 frá 15. mai 2014. http://www.logir.fo/foldb/llofo/2007/0000036.htm. Kunngerð um lestrarstuðul: http://www.logir.fo/foldb/kunfo/2011/0000107.htm

[32] Sí kap. 13 um uppskot til endurskoðan av lóggávu viðv. ÚS.

Næmingar varðveita sama rætt til stuðul eftir lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk sum onnur við skerdum arbeiðsførleika. Um næmingur søkir um fyritíðarpensjón, og Almannaverkið ikki metir, at til ber at betra arbeiðsevnini við SSM ella øðrum fyriskipanum, hevur viðkomandi rætt til fyritíðarpensjón. ÚS-studningur verður goldin út óskattaður, og sostatt ávirkar hann ikki pensjónútgjaldið.

**Tilmæli:** Næmingar í SSM eiga sum grundregla at fáa ÚS eftir vanligum reglum við møguligari hægri upphædd sum kompensatión. Í flestu førum hava næmingarnir somuleiðis rætt til útgjald eftir Lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk ella Lóg um almannapensjónir. Sí fylgiskjal 11 við dømum um fíggjarstøðuna hjá næmingum sbrt. tilmælinum.

# 11.0 KOSTNAÐARÆTLAN

## 11.1 KOSTNAÐARÆTLAN Í SAMBANDI VIÐ STOVNSETAN AV SERLIGA SKIPAÐUM MIÐNÁMI

Ilt er at gera neyva kostnaðarætlan fyri, hvat hvørt SSM tilboð til hendan bólkin fer at kosta. Tað veldst um, hvør tørvurin hjá tí einstaka er, og hvørja SSM skipan talan er um. Ein meting kann tó gerast í mun til ætlaðu tilboðini og við støði í verandi serflokki í Hoydølum.

**Kostnaður pr. næming í SSM-skipanini í mun til starvsfólkaorku**

Mett útfrá tørvinum á starvsfólkum, so verður mett, at ein næmingur kostar í miðal 140.000 kr. um árið. Tá er mett, at læraralønin er uml. 40.000 kr. mðr. brutto og at tað eru uml. 1 starvsfólk til 3 næmingar.

Metingin byggir á ta fyritreyt, at talan er um eitt nýtt økið, sum krevur eina ávísa tillagingartíð. Alt er nýtt hjá øllum starvsfólkum og hjá næmingunum. Tí má roknast við, at tørvur er á 3 fulltíðarstørvum til 8 næmingar – harav 2 lærarar, har minst ein hevur serlæraraútbúgving og øðrum starvsfólki so sum námsfrøðingi. Tað er tó sera torført at siga, hvørjum førleikum tørvur er á afturat serlærara, tí tað veldst um næmingarnar. Um hesi arbeiða fulla tíð, verða ætlandi 25 tímar um vikuna til undirvísing og restin til fyrireiking, eftirmeting, fundir og samskifti v.m. Roknast má við, at hvør lærari / starvsfólk kostar um 40.000 um mðr. brutto. Hesi tøl mugu tó takast við fyrivarni við tað, at tað er ógreitt, hvør sáttmáli er galdandi á økinum. Tað kann hugsast, at bæði lærarar og

námsfrøðingar verða settir eftir sáttmálanum hjá YF sum bachelorar - ella at heilt nýggjar avtalur skulu gerast fyri økið. Eitt SSM kostar sostatt umleið 120.000 kr. um mánaðin. ella 1,44 mió. um árið, tó fyrsta árið lutfalsliga minni, tí heysthálvan er lutfalslig styttri, um roknað verður við løn í 5 mánaðir.

Ætlanin er, at tað samanlagt skulu verða 104 næmingar, tá ið skipanin er komin í fasta legu í 2019. Hetta merkir, at skipanin ætlandi kemur at kosta 14,6 mió. kr. í starvsfólkalønum.

**Førleikamenning og eftirútbúgving**

Sum áður nevnt verður mett, at tað hevur alstóran týdning, at starvsfólk sum arbeiða í SSM-skipanini eru væl skikkað og hava nøktandi útbúgving innan serøkið.

Tá SSM-skipanin skal stovnsetast og uppbyggjast er neyðugt at leggja upp fyri, at starvsfólk fáa møguleika at førleikamenna seg og møguliga at fáa eftirútbúgving. Torført er at meta um kostnaðinum av førleikamenning, tí tað veldst um, hvussu umfatandi førleikamenning byrjað verður við, og hvussu henda verður skipað.

Mett verður, at uml. 100.000 kr. skulu setast av árliga til førleikamenning. Her verður roknað við, at neyðugt verður við undirvísing í eitt nú OCN-skipanini, grundleggjandi kunnleika til serundirvísing, foreldrasamstarv, etikk o.a.: Undirvísingin kann lutvíst verða veitt av útlendskum undirvísarum og av starvsfólki á Námsvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum. Eisini er lagt upp til, at starvsfólk fara í starvsvenjing, t.d. ein mánað í Danmark hjá t.d. Uddannelsescenter Mariebjerg í Vem ella Knudmosecenteret í Herning[33] ella t.d. í miðnámsskúla í Íslandi.

Hædd eigur eisini at takast fyri, at eftirútbúgving innan sernámsfrøði á Námsvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum krevur meirkostnað.

**Útgerð og hølisviðurskifti**

Givið er, at tað kemur at hava útreiðslur við sær at útvega neyðug høli til SSM í vanligu miðnámsskúlunum. Mett verður tó, at tey høli, sum eru, og tær nýbyggingar, sum eru ígongd, í stóran mun kunnu rúma SSM tilboðunum. Neyðugt verður tó at gera ítøkiligar kostnaðarmetingar,

[33] Sí fylgiskjal 1 við ferðafrágreiðing.

so hvørt sum tilboðini verða sett í verk.  Harumframt er torført at meta um, hvør útgerð krevst, tá tørvurin hjá næmingunum er ókendur. Mett verður, at neyðugt verður við t.d. ljóðdoyvandi leysum skilaveggjum at seta millum arbeiðspláss + innbúgvi so sum sofur, borð og stólar, + undirvísingaramboð og tilfar, teldu, prentara o. tíl. Mett verður, at uml. 100.000 kr. skulu setast av so hvørt sum eitt nýtt tilboð verður stovnsett, men skal metingin takast við fyrivarni.

Íalt verður mett, at eitt SSM tilboð á einum miðnámsskúla við 8 – 10 næmingum leysliga kostar:

| | |
|---|---|
| 3 starvsfólk | 1,4 mió. um árið |
| Gera hølir klár + útgerð | 100.000 kr. |
| Førleikamenning | 100.000 kr. Førleikamenning til øll SSM tilb. samskipað. |

Útfrá hesum verður mett, at eitt SSM tilboð kostar uml. 140.000 kr. pr. næming um árið.

Í mun til tilmælini, so er neyðugt við eini játtan áljóðandi 28 x 58.000 = 1,9 mió. í 2015. Tá er roknað við, at skúlaárið 2015 er 5 mánaðir. Í tráð við tilmæltu tilgongd so verða 26 nýggir næmingar í 2016, 30 í 2017 og 20 nýggir næmingar í 2018. Tvs. umleið 104 næmingar í SSM skipanini býtt í 4 árgangir. Harumframt koma 14 næmingar ella meira á Rásini. Hesi tøl mugu tó takast við fyrivarni, tí ikki er vist, at tilgongdin ella tørvurin verður so stórur. Talvan niðanfyri er ein kostnaðarmetan av SSM komandi árini, men fyrivarni verður tikið fyri, at hetta er ein meting. So hvørt SSM verða skipað á skúlunum, krevst ein neyv kostnaðarætlan í hvørjum einstøkum føri.

| Í tús. kr. | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|
| SSM | 1900 | 5700 | 9600 | 13000 |
| Førleikamenning | 100 | 100 | 100 | 100 |
| Høli, útgerð o.a. | 200 | 300 | 400 | 400 |
| Íalt | 2200 | 6100 | 10000 | 13500 |

Samanlagt verður mett, at tað fer at kosta áleið 13,5 mió. kr. krónur í tíðarskeiðnum 2015-2018 at fremja ætlanirnar, sum eru í hesum tilmæli.

## 11.2 RÁSIN

Rásin kostar í dag 2,8 mió. kr. og fer Rásin at kosta nøkulunda hesa upphædd í 2015. Tó er lagt upp fyri, at Mentamálaráðið rindar skúlapartin og Almannamálaráðið rindar fyri búpartin við teirri treyt, at Almannaverkið er við til at visitera til búpartin, og tá ið Rásin gerst partur av SSM verður búparturin partur av virkseminum hjá Almannaverkinum. Lagt er upp fyri hesum á FL 2015, men hædd er ikki tikin fyri útreiðslum í sambandi við, at høli skulu útvegast í sambandi við, at tilboðið skal víðkast við 7 næmingum í 2016.

Ætlanin fyri 2015 er, at Mentamálaráðið rindar 1,8 mió kr. og Almannamálaráðið rindar 1,0 mió kr.

Útfrá samlaðu játtanini til Rásina í ár, kostar ein næmingur har samlað umleið 400.000 kr. um árið. Við øktum næmingatali á Rásini til 14 næmingar komandi árini verður mett, útfrá verandi tølum, at samlaður kostnaður fyri Rásina verður umleið 5,6 mió. kr. pr. ár komandi árini. Hetta talið er bert vegleiðandi. Hugsast kann, at við øktum næmingatali verður samlaði kostnaðurin serliga fyri búpartin minni, tí starvsfólkaorkan kann gagnnýtast betur. Viðmerkjast skal eisini, at aðrar útreiðslur so sum víðkan av hølum o.a. ikki er tikið við í hesi upphædd.

## 11.3 SERNÁMSFRØÐILIG SAMSKIPAN OG RÁÐGEVING

Mett verður, at neyðugt verður at seta fólk, at røkja samskipandi leiklutin og sernámsfrøðiliga ráðgeving í mun til SSM, sum verður staðsett á Sernámi. Um viðkomandi skal hava cand. pæd. pæd.psyk. ella aðra pæd. pæd útbúgving, kemur hetta at kosta uml. 500.000 kr. árliga. Henda játtan er ikki raðfest í fíggjarárinum 2015.

## 11.4 KOSTNAÐARÆTLAN FYRI STUÐULSFYRISKIPANIR ÍSV SSM

Sum sæst í tørvslýsingini fáa summi í málbólkinum longu stuðulsfyriskipanir hjá Almannaverkinum. Í teimum førum verður í størri mun talan um at umskipa tilboðið, tey longu fáa. Er tilboðið tey fáa í samband við SSM av sama slagi, sum tilboðið tey longu fáa, hevur hetta ikki stórvegis eyka kostnað við sær. Er talan um at umskipa eitt stuðulstilboð til bútilboð, er talan um meirkostnað.

Ilt er at gera neyva kostnaðarætlan fyri, hvat bútilboð og stuðulsfyriskipanir til hendan bólkin fara at kosta. Tað veldst um, hvør tørvurin hjá tí einstaka er, og hvørji SSM- tilboð verða veitt. Ein meting

kann tó gerast út frá kostnaði av verandi tilboðum hjá Almannaverkinum. Kostnaðurin fyri ymisk tilboð er lýstur niðanfyri:

Kostnaður av stuðulsfyriskipanum hjá Trivnaðartænastuni. Talan kann vera um bústaðartilboð, stuðulsfyriskipanir, mentortoymi og frítíðartilboð v.m. Kostnaðurin er **bert fyri lønir** og roknað verður við miðal lønum til námsfrøðing og er støði tikið í verandi tilboðum, sí niðanfyri útgreining.

**Bútilboð**:

**Búfelagsskapur ella næmingaheim til uml. 10 borgarar**. Kostnaðurin er ásettur eftir, at borgarar skulu kunna klára seg rímiliga væl sjálvi og uttan náttarvakt, eins og at tey eru úti part av degnum. Samanberast kann við Heiðaveg (búfelagsskapur): **1,1 mill. kr. árl**. Royndir vísa, at størri fyriskipanir eru bíligari at reka. Kostnaður er tann sami um tað t.d. búgva 10 ella 12 borgarar.

**Sambýli til 4-6 borgarar**. Kostnaðurin er ásettur eftir, at búfólki hevur tørv á náttarvakt, og eru úti part av degnum. **1,9 mill. kr. árl. Royndir vísa, at størri fyriskipanir eru bíligari at reka. Um 10-12** borgarar búgva í sambý**li av hesum slag**, vildi starvsfólkanormeringin hækka við 1 ½ starvsfólki. Talan er um seinnaparts- og kvøldtímar, og kostnaðurin vildi tá hækka við 1,1 mill. samlaði kostnaðurin vildi sostatt verið 3. mill.

§ 27 bú- og virknistilboð kunnu eisini metast eftir omanfyristandandi.

**Stuðulsfyriskipanir**:

**1-1 stuðul** er fyriskipan, har eitt starvsfólk er um ein borgara. Hvussu nógvir tímar verða tillutaðir er tengt at tørvinum hjá hvørjum einstøkum. **Kostnaður fyri hvønn starvsfólkatíma (dagtímar) er 210 kr./t.** Nøkur tillegg skulu leggjast afturat, um talan er um kvøld- ella vikuskiftistímar. 1-1 stuðul verður ikki nógv brúkt. Hendan skipan verður serliga brúkt í útjaðaranum, har tað kann vera ringt at samla fleiri borgarar til eitt toymi.

**Mentortoymi** er fyriskipan, har eitt toymi av starvsfólki eru um nakrar borgarar nakrar tímar um vikuna. Til samanbering kann nevnast Mentortoymið í Hoydølum (25 t/v til 6-7 næmingar): **300.000 kr. árl.**

**Frítíðartilboð** er dagtilboð, har nøkur starvsfólk eru um nakrar borgarar. Vanliga eru eini 7-12 borgarar og 2-3 starvsfólk. **Kostnaður: umleið 70.000 kr/mðr**.

**Frítíðarklubbar** er fyriskipan, har nøkur fá starvsfólk eru um nakrar borgarar. Talan er um tilboð, sum borgarar frítt kunnu brúka, tá opið er. Neyðugt er ikki við visitering. Frítíðarklubbar eru bíligastu stuðulsfyriskipanir, sum Trivnaðartænastan veitir. **Kostnaður: umleið 20.000 kr./mðr**.

Í mun til tilboðini, sum mælt verður til at skipa, og sum eru nærri lýst í kap. 7 er ein leyslig kostnaðarmeting gjørd. Í kostnaðarmetingini er lagt upp fyri, at tað verða skipaði mentortoymi, frítíðartilboð og frítíðarklubbar so hvørt sum fleiri næmingar verða tiknir upp kring landið. Lagt er upp fyri, at bústaðartilboð í Tórshavn verða skipað sum bú- og viðgerðartilboð ella búfelagsskapur/næmingaheim. Stórur tørvur er á bústaðartilboðum í Tórshavn og tí, at ætlanin er at skipa bústaðartilboð, sum eru serliga ætlað og knýtt at serflokkinum í Hoydølum/Marknagilsdeplinum. Hædd er ikki tikin fyri bústaðartilboðum í Eysturoy, Norðoyggjum og Suðuroy. Óvist er, hvussu nógv bústaðartilboð tørvur er á í hesum økjum og tí, at í Eysturoy og Norðoyggjum verða fleiri bústaðir bygdir í løtuni. Sannlíkt er, at fleiri av framtíðar næmingunum fara at hava bústað í nýggju bústøðunum.

Lagt er upp fyri, at stuðulsfyriskipanir v.m. verða settar í verk 1. juli í tí ári, sum skúlatilboðið byrjar og framskrivað verður so til fult virksemi í komandi kalendaraári. Lagt er upp fyri, at stuðulstilboðini hjá Trivnaðartænastuni verða eisini veitt í feriutíð.

| Í tús. kr. | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|
| Bústaðartilboð | 552 | 1.104 | 1.656 | 2.208 |
| Mentortoymi | 450 | 1.350 | 2.550 | 3.750 |
| Frítíðartilboð | 840 | 2.940 | 5.040 | 7.140 |
| Frítíðarklubbur | 240 | 840 | 1.440 | 1.920 |
| Íalt | 2.082 | 6.234 | 10.686 | 15.018 |

Samanlagt verður mett, at tað fer at kosta áleið 15 mió. kr. krónur í tíðarskeiðnum 2015-2018 at fremja ætlanirnar, sum eru í hesum tilmæli. Trivnaðartænastan hevur ikki fígging til at veita hesar tænastur.

## 12.0 UPPSKOT TIL ÁBYRGDAR- OG ÚTREIÐSLUBÝTIÐ MILLUM MENTAMÁLARÁÐIÐ OG ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Meginreglurnar eiga at vera geiraábyrgd og minsta inntriv, sum merkir, at tilboðini í mest møguligan mun skulu skipast í vanligu útbúgvingarskipanini. Leiðslubygnaðurin eigur at avspegla geiraábyrgdina, soleiðis at gjald og vald fylgjast at. MMR skipar skúlapartin og AMR skipar bútilboð og stuðulsfyriskipanir. Samstundis mugu hesir tættir samskipast so væl, at tað fyri borgaran kennist sum eitt heildartilboð.

Viðvíkjandi Rásini er uppskotið, at tilboðið hoyrir undir einum ráði, sum nú er Mentamálaráðið. Mann kundi eisini hugsa, at við tíðini, tá ið serliga skipað miðnám rættiliga er komið í fasta legu, og nøktandi tilboð eru á flestu miðnámsskúlum, so fer Rásin at knýta seg at SSM á miðnámsskúlunum í økinum. Tá verður búparturin fluttur til Almannaverkið.

## 13.0 ENDURSKOÐA LÓGGÁVUNA OG GERA UPPSKOT UM TILLAGINGAR Í MUN TIL UPPSKOTIÐ, SUM ARBEIÐSBÓLKURIN KEMUR VIÐ.

Viðvíkjandi serliga skipaðum miðnámi (SSM) er lógarheimild fingin til vega til hesa fyriskipan í fjør[34]. Henda lóg ásetur, at heimilað er landsstýrismanninum í mentamálum at skipa serliga skipað skúlatilboð til ung við serligum tørvi. Uppskot til lógarbroyting í ávikavist SIT- og FHS- lógini, sum skal heimila serliga skipað skúlatilboð á yrkisnámi er farið til hoyringar, og miðað verður eftir at fáa lógarbroytingina samtykta í vár.

Í sambandi við lógina um Rásina verður mælt til lógarbroyting, soleiðis at aldursmarkið fyri upptøku, sum er 18 ár, verður broytt til eftir fólkaskúla. Eisini verður mælt til, at skúlagongdin verður avmarkað til í mesta lagi 2 ár og ikki 3 ár, sum lógin letur upp fyri í dag. Somuleiðis verður mælt til broyting í upptøkunevndini, soleiðis at upptøka fer fram í felags visitatiónsbólkinum til serliga skipað miðnám.

Sbrt. verandi lestrarstuðulslóg er ásett í § 4, stk. 1 at: *"Ein útbúgving er stuðulsheimilað, tá hon er skipað sum heiltíðarlestur, er minst 3 fylgjandi mánaðir til longdar, er ólønt og endar við próvtøku."* Kannast eigur og støða takast til um møgulig lógarbroyting er neyðug, so SSM á serbreyt lýkur kravið um, at útbúgvingini "*endar við próvtøku*". Í Danmark hava ung við serligum tørvi á hægri útbúgvingum møguleika at søkja um "handicaptillæg"[35]. Líknandi skipan kundi verið umhugsað fyri henda málbólk á miðnámi, so møguleika er at søkja um ískoyti vegna serligan tørv umvegis lestrarstuðulsskipanina. Hin møguleikin er eisini at ískoyti verður veitt frá Almannaverkinum.

---

[34] http://www.logting.fo/files/casestate/14341/122.13%20U.t.ll.%20um%20br.%20i%20ll.%20um%20gymnasialar%20midnamsutbugvingar.pdf

[35] http://www.su.dk/SaerligStoette/handicaptillaeg/Sider/default.aspx

# 14.0 NIÐURSTØÐA

Við støði í arbeiðssetninginum er hetta tilmælið bygt upp útfrá fýra meginreglum, sum í høvuðsheitinum snúgva seg um geiraábyrgd, innklusjón, kompensatión og samskipan.

Sum tað fyrsta hevur arbeiðsbólkurin gjørt eina lýsing av tørvinum á skúla-, stuðuls-, frítíðar og bústaðartilboðum millum ung frá 16-25 ár. Henda tørvskanningin staðfestir, at tað er stórur tørvur á tílíkum tilboðum, men at hann er óvanliga stórur nú, tí avmarkað tilboð hava verið. Roknað verður við, at árliga fara umleið 25-30 ung framyvir at hava tørv á serliga skipaðum tilboðum.

Við støði í tørvinum og meginreglunum um innklusjón, hevur arbeiðsbólkurin gjørt uppskot um at seta á stovn ein yvirskipaðan bygnað fyri miðnám fyri ung við serligum tørvi, nevnt SSM við serbreytum og serflokkum í høvuðsheitum við staðseting á vanligu miðnámsskúlunum. Viðvíkjandi Rásini, so metir arbeiðsbólkurin, at Rásin eigur at verða varðveitt sum tað heildartilboð tað er undir Mentamálaráðnum, sum tó við tíðini fær tættari tilknýti til SSM skipanina í vanligu miðnámsskúlunum í økinum. Mælt verður til, at SSM kann umfata vanligt prógv ella eitt OCN-líknandi prógv/skjalaváttan.

Út frá tørvslýsingini verður mælt til, at SSM skipan verður raðfest komandi árini at vera staðsett í verandi miðnámsskúlaeindum í Tórshavn, Kambsdali og Klaksvík. Raðfestast eiga eisini slík tilboð í Suðuroy. Bólkurin hevur gjørt uppskot til eina íverksetanartilgongd frá 2015 til 2018, sum vísir, at um byrjað verður komandi ár, so er møguleiki fyri, at í 2018 eru tilboð til øll, sum ynskja hetta á miðnámi. Í tilknýti til skúlatilboðini mælir arbeiðsbólkurin til at seta í verk stuðuls- og frítíðartilboð til tey heimabúgvandi og bútilboð til teirra, sum hava tørv á tí. Talan kann eisini vera um mentortoymi, sum virkar sum eitt stuðulstoymi, um frítíðartilboð, sum eru aftaná skúlatíð, frítíðarklubbar nøkur kvøld um vikuna og bú- og virkistilboð, sbrt  27 í forsorgarlógini.

Tað hevur stóran týdning at raðfesta høli inni í vanligu miðnámsskúlunum til hesa skipan, og at fjølbroyttur starvsfólkahópur verður knýttur at eini SSM skipan, sum virkar í  toymi við toymisleiðara. Fakligur førleiki innan serøkið hevur alstóran týdning í hesi skipan, og mælt verður til út- og eftirútbúgving av starvsfólki..

Arbeiðsbólkurin skjýtur upp, at Sernám, sum miðstøð innan sernámsfrøðiliga øki, stendur fyri samskipan av SSM og sernámsfrøðiligu ráðgevingini, sum mælt er til skal knýtast at miðnámsskúlaøkinum.

Í tráð við meginregluna um samskipan og kompensatión er eisini  skotið upp, at ein samlað og skipaða visitatión umboðandi Sernám, miðnámsskúlarnar, Almannaverkið og viðkomandi skúli, har næmingurin hevur gingið, visiterar til skúlatilboðini, harundir skúlatilboðið á Rásini og metir um, hvørt neyðugt er at søkja Almannaverkið um  stuðuls-, frítíðar ella  bútilboð.

Næmingar, sum ganga eftir SSM eiga at fáa ÚS eftir vanligum reglum við møguligari hægri upphædd sum kompensatión. Støða má takast til, hvør skal veita hesa kompensatión og taka hædd fyri lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk og lógini um fyritíðarpensjón, sum eisini verður galdandi fyri næmingar í SSM skipanini.

Ein SSM skipan krevur neyva samskipan millum skúlatilboðið og stuðulsfyriskipanirnar og bútilboð, og tað hevur stóran týdning, at áhaldandi samskiftið er millum skúlan og tey tilboð, ið vera veitt av Almannaverkinum eftir skúlatíð. Toymisfundir eiga at vera regluliga millum hesar skipanir. Í gerandisdegnum mugu møguligir trupulleikar í einari skipan, og sum krevja samstarv við hina skipanin, vera møguligir at loysa skjótast til ber. Smidligar loysnir eru ógvuliga týdningarmiklar í hesum samstarvi og samskipan. Samstarv og samskifti við Sernámsfrøðiligu skipanina má eisini í fasta legu.

Neyv geiraábyrgd eigur at fylgjast, har Mentamálaráðið hevur ábyrgd av skúlapartinum og Almannamálaráðið hevur ábyrgd av stuðuls-, frítíðar- og búpartinum, men fyri at tryggja áhaldandi samskipan, samstarv og samanhang er neyðugt at hava samskipan á ráðsstigi, tvs millum AMR og MMR og millum stovnarnar, tvs. Almannaverkið, Sernám og skúlaleiðslurnar.

Grundleggjandi fyritreytin fyri, at tað skal eydnast ungum við serligum tørvi at gjøgnumføra eina SSM útbúgving er, at skúla og stuðulstilboðini, sum liggja aftaná skúlatíð, verða samskipað, og arbeitt verður miðvíst í felag fram ímóti málinum. Tað er altumráðandi, at samanhangur er millum politisku ætlanirnar á skúlaøkinum og á almannaøkinum. Tískil mælir bólkurin til, at landsstýrisfólkini hvør í sínum lagi, men tó í felag, tryggja neyðugar karmar fyri at skapa fleiri skúla-, frítíðar- og stuðuls/bútilboð. Bólkurin mælir til, at landsstýrisfólkini í felag tryggja sær, at politisk undirtøka er fyri tilmælinum fyri at skapa neyðugar karmar at arbeiða undir, um tilmælini skulu setast í verk.

Arbeiðsbólkurin vónar, at tikið verður væl ímóti tilmæltu átøkunum í hesum tilmæli.

# 15.0 TILMÆLI

Arbeiðsbólkurin mæli til hetta:

1. Innkluderandi miðnámsskúlaskipan fyri ung við serligum tørvi
2. Skipa serliga skipað miðnám (SSM) annaðhvørt sum serbreyt ella serflokkur við eini tilgongd, har eitt ella tvey nýggj tilboð vera sett á stovn á hvørjum ári alt eftir tørvi.
3. Skúlatíðin er frá 8 – 13. Skipað undirvísing á skúlanum í lestrarfrídøgum o.t.
4. Stuðulsfyriskipanir í frítíðum, ferium o.ø. frídøgum.
5. SSM skal skipast sum eitt samskipað tilboð við møguleika fyri 4 árum
6. Meginreglan er, at skúlabyrjan er við skúlaársbyrjan t.e. miðjan august, men møguleiki fyri at byrja seinni í skúlaárinum
7. Næmingurin skal fáa prógv, sum er grundað á OCN-skipan og sum vísir, hvørjir førleikar viðkomandi hevur.
8. Rásin hoyrir undir eitt ráð. Skúlaparturin fær við tíðini størri samstarv við SSM í økinum t.d. miðnámsskúlar í Klaksvík og á Kambsdali. Skipað sum eitt tvey ára skeið. Tekur næmingar inn á hvørjum ári. Tá ið Rásin er vorðin partur av SSM, kann búparturin gerast partur av Almannaverkinum.
9. SSM verður samskipað við stuðulsfyriskipanir og evt. bútilboð aftaná skúlatíð eftir mettum tørvi. Leisturin kann vera at skipa skúlatilboð og stuðulstilboð, skúla-, stuðuls- og frítíðartilboð, skúla, stuðuls-, frítíðar- og bútilboð ella skúla- og næmingaheim.
10. Virkisætlan, sum Almannaverkið ger og læruætlan (t.d. OCN), sum skúlin ger, skulu hanga saman.
11. Fjølbroyttur starvsfólkahópur við ymiskum førleikum, sum arbeiðir í toymi á SSM við toymisleiðara, sum virkar sum deildarleiðari fyri SSM.
12. Førleikamenna starvsfólkahópin so hvørt, sum tilboð verða stovnað, fyri at tryggja dygd og innihald. Møguliga skipað útbúgving/eftirútbúgving innan sernámsfrøði á Námsvísinda-deildini á Fróðskaparsetri Føroya.
13. Sernám, sum er miðstøð fyri sernámsfrøðiligari ráðgeving til fólkaskúlan, stendur fyri samskipan og at veita sernámsfrøðiliga ráðgeving. Miðnámsskúlaøkið á Sernámi má raðfestast, og fíggjarlig orka setast av til hetta arbeiðið. Tryggjað má vera áhaldandi og skipað samstarv. Samskipari og mennari av skipanini staðsettur á Sernámi.

14. Samlað og felags visitatión umboðandi skúlan, næmingurin kemur frá, miðnámsskúla, Almannaverkið og Sernám.
15. Vanligan lestrarstuðul (ÚS) og ískoyti frá Almannaverkinum eftir almannalóggávuni.
16. Mentamálaráðið tekur sær av skúlapartinum og Almannamálaráðið av tí, sum er uttanfyri skúlan
17. Samanlagt skulu 120 skúlatilboð skipast í tíðarskeiðnum 2015-2018. í Tórshavn verða 48 næmingar, á Kambsdali 24 næmingar, í Norðoyggjum 24 næmingar, í Suðuroy 12 næmingar og Rásin kemur at hava 14 næmingar.
18. Til hesi tilboð verða skipaði mentortoymi, frítíðartilboð, frítíðarklubbtilboð og í ein avmarkaðan mun bústaðartilboð.
19. Lógarbroyting gerast í løgtingslóg nr. 67 frá 2. Mai 2003 um skúlatilboð til ung við breki, sum broytt við løgtingslóg nr. 115 frá 18.desember 2008. Broytingar gerast í løgtingslógum um SIT og FHS. Hesar eru farnar til hoyringar

# 16.0 KELDULISTI


Ainscow, M., Booth, T. og Dyson, A. (2006). *Improving Schools, Developing Inclusion*. London: Routledge.

Dyssegaard, C. B., Larsen, M. S., og Tiftikci, N. (2013) *Effekt og pædagogisk indsats ved inklusion af børn med særlige behov i grundskolen. Systematisk review*. København. Dansk Clearinghouse for Uddannelsesforskning, IUP, Aarhus Universitet.

Leinki til Dansk Clearinghouse:
http://edu.au.dk/forskning/omraader/danskclearinghouseforuddannelsesforskning/

Leinki til rapportina:
http://edu.au.dk/fileadmin/edu/Udgivelser/Clearinghouse/Review/review_inklusion_2013.pdf

Farrell, P. (2002). Making inclusion a reality for all. Forelæsning, holdt ved ISPA's conference i Nyborg. I: Egelund, N. & Tetler, S. (red.) (2009). *Effekter af specialundervisning. Pædagogiske vilkår i komplicerede læringssituationer og elevernes faglige, sociale og personlige resultater*. Danmarks Pædagogiske Universitetsforlag

Hansen, J. H. (2011). *Barrierer for inklusion i den pædagogiske praksis*. I: Pædagogisk Psykologisk Tidsskrift. Forlaget Skolepsykologi. Pædagogiske Psykologers Forening. Tema Inklusions- og eksklusionsprocesser i sociale sammenhænge. 48. årgang 03

Hoyringina av ST-sáttmálanum um tey, ið bera brek. http://www.mbf.fo/page.php?Id=44&l=fo

## 17.0 FYLGISKJØL

1. Ferðafrágreiðing
2. OCN- skipanin. Handverk og vinna
3. OCN-skipanin. Persónligir og sosialir førleikar
4. lýsingarblað 1 - grundupplýsingar
5. lýsingarblað 2 - endurmenning í mun til arbeiðsmarknaðin - arbeiði og uppihald
6. lýsingarblað 3 - endurmenning í mun til gerandisdagin - virkislív, heimalív og frítíð
7. lýsingarblað 4 - meting tilráðing og avgerð
8. virkisætlan
9. SMTTE myndil og virkisætlan, sum er eitt dømi um námsfrøðiliga virkisætlan, sum Almannaverkið/Trivnaðardepilin brúkar í sínum tænastum.
10. Dømi um stuðulsveitingar til næming
11. Fíggjarligar avleiðingar. AMR

(Fylgiskjøl 4 – 8) er sosialfakliga heildarlýsingin, sum Almannaverkið brúkar í teimum førum, har borgarin hevur samansettar trupulleikar, og støðutakanin krevur eina sosialfakliga heildarmeting